Olivia W. Hansen

Sálmar
- til fólkaskúlan



Framhaldsdeild

Olivia W. Hansen

Sálmar til fólkaskúlan

- framhaldsdeild



Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Olivia W. Hansen
Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild
©Føroya Skúlabókagrunnur 2008
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 2008
ISBN 978-99918-0-962-5

Innihaldsyvirlit

Sálmar 8

Hvat er ein sálmur? 8
Ymisk sløg av sálmum 9
Nøkur dømi um, hvussu sálmar kunnu flokkast eftir innihaldinum 10
Sálmar og bíbilskar vísur 10
Sálmagreining 11

19 Nú takkið Guði øll 12
Um sálmin 12
Lovsangir 13
Aðrar uppgávur 13

37 Hvar Guð vil, glaður fari eg 14
Uppgávur: 15

43 Tín miskunn, o Guð, er sum himinin há 16
Um sálmin 16
Miskunn og troyst 17

67 Eg vil mínum Harra prísa 18
Um sálmin 18
Ein Kingosálmur 19

82 Ver vælkomið, Harrans ár 21
Um sálmin 21

103 Tað sótu seyðamenn á vakt 23
Hirðarnir 23

123 Dýrasti Jesus 25

174 Heilur, frelsari og Kristur! 27
Ein miðaldarmunkur syngur um krossin 27

179 So stillan Jesus gongur 30
Jesus ríður inn í Jerúsalem 30
Føstusálmarnir hjá Kingo 31

195 Deyði hvar er nú broddur tín? 33
Jesu uppreisn 34

198 Sum ígjøgnum sortar skýggja 36
Um sálmin 36

229 Nú skínur sól í dýrd og mæti 39
Um sálmin 39
Uppgávur: 40

255 Vár Guð er føst og haldgóð borg 41
Um sálmin 41

318 Um tú vilt gleði vinna 44
Um sálmin 44
Uppgávur: 45
Slatur 46

327 Hin signaða dag vit síggja fró 47
Um sálmin 47
Ljósið 48
Alt hevur Guð gjørt lagaliga til sína tíð 49

398 Miskunnsami mildi faðir 50
Um sálmin 50
Dagligt breyð 51
Uppgávur 52

503 Frelsarin hirði mín góður er 53

Frelseren er mig en hyrde god 53
Hin góði hirðin 53
Um sálmin 54

516 Ljósið rann av kærleiks runni 55

546 Sí, úr havi rísur nú morgunsól 57
Um sálmin 57
At týða sálmar 58

561 Nú sólin aftan fyri fjall 61
Um sálmin 61

576 Nú leiti eg til tína náði 63
Um sálmin 63

Sálmaskald 65

Martin Luther 1483-1546 65
Thomas Hansen Kingo 1634-1730 67
Hans Adolf Brorson 1694-1764 69
Nicolaj Frederik Severin Grundtvig 1783-1872 71
Jacob Dahl 1878-1944 74
Jacob Dahl sum sálmaskald og týðari 76
Mikkjal Dánjalsson á Ryggi 1879 – 1956 77

Sálmar

Orðið sálmur kemur av grikska orðinum psalmos og merkir sangur til streingjaleik. Upprunaliga var orðið sálmar einans nýtt um sálmarnar í Gamla Testamenti. Hesir sálmarnir vóru knýttir at guðsdýrkanini í templinum hjá ísraelsmonnum í Jerúsalem.

Í Nýggja Testamenti finnast nógv dømi um, at tær fyrstu kristnu samkomurnar hildu fast við sálmarnar, serliga Dávids sálmar, og bæði Jesus (Matt. 22,44) og Paulus (Róm. 3,10) endurgeva úr sálmunum.

Gjøgnum alla miðøldina varðveita sálmarnir úr Gamla Testamenti sína serstøðu, ikki minst tí at teir verða nýttir sum ein liður í tíðarsanginum (tidesang) í kleystrunum og sum partur av katólsku messuni.

Eisini trúbótarmenninir styðjaðu seg nógv til tann gamla sangsiðin, og sálmarnir úr Gamla Testamenti gjørdust fyrimynd fyri nýggja sálmayrking.

Luther helt ikki so fast við tann gamla sangsiðin. Hann gekk inn fyri meira frælsi, og tað, ið um galt, var at raka meiningina í tí halgu skriftini, og tí skuldi frælsi ráða viðvíkjandi orðavalinum. Luther vildi, at Guðs orð skuldi ljóða og virka í fólkinum sum ein livandi rødd í samtíðar málbúna. Tí fór Luther undir at umyrkja og týða latínskar sálmar til móðurmálið. Har afturat yrkti hann eisini sálmar. Luther vildi hava fólkið at taka lut í gudstænastuni, og tí skuldu tey syngja við. Í tí katólsku kirkjuni var leikfólkið ikki við í sálmasanginum, men eitt kór stóð fyri sanginum.

Hvat er ein sálmur?

Sálmar eru nýtsluyrkingar, ein serligur bólkur av sangum, ið eru skrivaðir til at brúka í kristnu gudstænastuni, øðrum kirkjuligum høpi og persónligari andakt.

Eins og tað er galdandi fyri aðrar nýtsluyrkingar, eitt nú fosturlandssangir, skulu sálmarnir lúka ávís krøv viðvíkjandi formi og innihaldi, fyri at kunna kallast sálmar.

1. **Fyrsta treytin er ein uttanveltað støða (objektivitetur)**. Tað, sálmurin sigur, skal hava alment gildi, ikki einans fyri skaldið, men fyri alla samkomuna. Sálmurin er játtandi, og við sálminum sigur samkoman frá sínum kenslum t.d. við lovsongi og bøn um hjálp og verður harvið styrkt í felagsskapinum og trúnni.

2. **Sálmurin skal hava ein boðskap, sum er tikin úr einum felags fatanarumhvørvi t.d. úr Bíbliuni, bíbilskum frásøgnum ella alment kristnum royndum og kenslum.** Nógvir sálmar eru skrivaðir til tær stóru kirkjuligu hátíðirnar, jól, páskir og hvítusunnu ella til ávísar liðir í gudstænastuni, eitt nú trúarjáttanina og altargongdina.

3. **Sálmurin skal vera sangbærur (góður at syngja)**. Sálmarnir eru yrktir til kirkjufólkið at syngja, og tessvegna hevur sálmurin reglulig ørindi, eina fasta rytmu (stev) og sum oftast endarím.

Men tað, sum ger sálmin til sálm – góðtekur (autoriserar) hann, – er, at samkoman tekur sálmin til sín og nýtir hann í gudstænastuni. Hvørt einstakt kirkjulið kann ikki gera sær sína egnu sálmabók. Hetta verður loyst á tann hátt, at teir kirkjuligu myndugleikarnir seta eina nevnd, sum fær til uppgávu at gera eina sálmabók. Við hesum er eisini sagt, at tað finnast nógvir sálmar á føroyskum, sum ikki eru við í Sálmabókini.

Ymisk sløg av sálmum

Sálmar kunnu vera ógvuliga ymiskir, og tað kann við hvørt vera sera torført at taka dagar ímillum, um talan er um ein sálm, eina bíbilska vísu ella ein sang. Í summum førum eru fólk ikki heilt samd um hetta. Nakrir sálmar eru lættir at flokka, sum t.d. ein jólasálmur ella ein páskasálmur, meðan aðrir eru ikki eins eyðsýndir.

Nøkur dømi um, hvussu sálmar kunnu flokkast eftir innihaldinum

a) **Ein bíbilskur sálmur,** er yrktur yvir ein ávísan tekst í Bíbliuni, greiðir frá einari ávísari hending í GT ella NT, er ein bíbliusøga, sum kann syngjast, ella er sum ein prædika yvir ávíst stað í Bíbliuni

b) **Ein sálmur, sum lýsir eitt ávíst huglag,** hevur einki beinleiðis við Bíbliuna at gera, men lýsir kristnilívið sum heild. Sálmurin lýsir menniskja og náttúruna. Sálmurin lýsir eitt huglag, t.d. sólina, sum rísur, gróðurin á markini, lívið sum heild, sorg og gleði o.s.fr.

c) **Ein hátíðarsálmur** er skrivaður til eina hátíð t.d. jól, páskir ella hvítusunnu.

d) **Ein sálmur til eitt ávíst høvi – ein tilburðarsálmur** er yrktur til ein ávísan tilburð, so sum barnadóp, brúðarvígslu, gravarferð, kirkjuvígslu ella ólavsøku.

e) **Finnur tú fleiri av nevndu eyðkennunum í sálminum**? Fleiri sálmar eru ein blandingur. Ein hátíðarsálmur kann eisini vera ein bíbilskur sálmur.

Sálmar og bíbilskar vísur

Ein sálmur ber altíð ein boðskap, ella sum orðabókin sigur: Andalig yrking (til gudstænastubrúk o.tíl.) Frá gamlari tíð hevur tað verið siður at syngja bæði sálmar og andaligar vísur í Føroyum, og við hvørt hava fólk havt torført við at skilja millum eina andaliga vísu og ein sálm. Bíbilska vísan er ein enduryrking av t.d. eini frásøgn í Bíbliuni, eini halgisøgu ella lærubókini. Skaldið kemur ikki við síni egnu tulking. Her er talan um endurgeving upp á rím. Sálmurin fer eitt stig longur, og tulkingin kemur inn í myndina. Skaldið førir ein boðskap fram, t.d. til uppbyggingar, troystan, ugga ella læru. Sálmurin lýsir kenslur og talar til kenslurnar hjá tí, ið syngur/lesur sálmin.

Sálmagreining

Hetta er ein frymil at greina sálmar eftir, men tú eigur at hava í huga, at tað ikki altíð ber til at svara øllum spurningunum, sum verða settir í frymlinum.

1. Les sálmin fleiri ferðir.
2. Slá torfør orð upp í orðabókini.
3. Hvussu eitur sálmurin?
4. Nær er sálmurin yrktur?
5. Hvør hevur yrkt sálmin?
6. Er talan um ein upprunasálm?
7. Er talan um týddan ella umyrktan sálm, hvør er so týðarin ella yrkjarin?
8. Hvør hevur gjørt lagið?
9. Nær er lagið gjørt?
10. Kunnu fleiri løg nýtast til sálmin? Um ja, hvørji?
11. Hvat snýr sálmurin seg um?
    Skriva ein stuttan samandrátt av sálminum ella tíggju lyklaorð í sálminum.
12. Skriva nøkur fá orð, um hvat kemur tær í huga, tá ið tú lesur ella syngur sálmin
13. Í hvønn mun er samsvar millum heiti á sálminum (fyrstu reglu í sálminum) og innihaldið?
14. Hvat ella hvørji ørindi hava mest týdning í sálminum?
15. Hvat slag av sálmi er hetta?
    a) Ein bíbilskur sálmur
    b) Ein sálmur, sum lýsir eitt ávíst huglag
    c) Ein hátíðar sálmur
    d) Ein sálmur til eitt ávíst høvi – tilburðarsálmur
    e) Finnur tú fleiri av nevndu eyðkennunum í sálminum?
16. Hvørji rím eru í sálminum?
    Endarím (parrím, krossrím og umgyrd rím), bókstavarím, ljóðrím?
17. Hvørjar skaldsligar myndir finnur tú í sálminum?
    Myndatalu (metafor), samanberingar, symbol - ímyndir?
18. Kann sálmurin býtast í partar?
19. Hvussu dámar tær sálmin? Grundað svarið.

19 Nú takkið Guði øll

1. Nú takkið Guði øll
við hjarta, munni, hendi,
sum signing sína oss
frá móðurlívi sendi;
alt tað, sum her í verð
oss fyri neyðum var,
og barnakor við Krist'
hans miskunn at oss bar.

2. Hin góði, ríki Guð
oss ævi vára fái
lív, gleði, treyst og frið
og signing, lívd og náði,
hann hjálpi oss hvønn dag
í náðini at stá
og náðiløn hjá sær
um tíð og ævi fá.

3. Lov veri, prís og dýrd
tær faðir, syni, anda,
tríeinur Guð tú ert,
ið bjargar oss úr vanda;
eyðmjúkiliga tær
vit bera lovsong nú,
so veiti tú oss styrk,
grundfest tú vára trú.

M. Rinckart 1636. Danskur 1740. G. Bruun.
Lag: Sl. 253 a, b og c.

Um sálmin

Týski presturin, Martin Rinckart (1586-1649), yrkti sálmin í 1636. Tað eru ymiskar meiningar um, hvaðani Rinckart fekk íblástur til sálmin, men sálmurin er umyrktur fleiri ferðir gjøgnum tíðina.

Nú takki Guði øll er ein lovsongur. At syngja Guði lovsong er ein natúrligur táttur av trúarlívinum. Lovsangurin er ikki einans bundin at kristindóminum, men er at finna í flest øllum átrúnaðum. Upprunin til hin kristna lovsangin er at finna í jødadóminum, sum kristindómurin er sprottin av.

Lovsangir

Í Bíbliuni finna vit fleiri dømi um, at fólk syngja Guði lovsong. Tá ísraelsfólk vóru komin turrskødd gjøgnum Reyða Havið og vóru bjargað undan heri Faraos, skipaði Mirjam, systir Mósesar, fyri lovsangi, og kvinnurnar bæði dansaðu og sungu Guði lovsang (2. Mós. 15,1-21). Dávid kongur sang lovsong fyri hjálp og bjarging (2. Sám. 22). Hanna, móðir Sámuels profet, sang lovsong, tí Guð hoyrdi bøn hennara, tá ið hon var barnleys (1. Sám. 2,1-10). Í Sálmunum í Gamla Testamenti finna vit eisini fleiri lovsangir, sum bæði einstaklingar og alt Ísrael sungu. Í Nýggja Testamenti syngur Maria Guði lovsong, tá ið hon fær at vita, at hon skal føða heimsins frelsara (Luk. 1,46-55), og Zakarias sang Guði lovsang, tá ið Jóhannes var føddur (Luk. 1,67-80).

Lovsangirnir í GT eru vanliga skipaðir á sama hátt. Lovsangurin er í trimum pørtum.

- Byrjað verður við at mæla fólki til at syngja lovsang.
- Síðani kemur høvuðsinnihaldið í sálminum, t.d. ein grundgeving fyri, hví lovsangurin verður sungin: ein frásøgn um Guðs mátt, miskunn, góðsku, náði, stórleika o.s.fr.
- Endað verður við, at fólk enn eina ferð enn verða biðin um at lova Guði.

Uppgávur:

1. Hyggið at, hvussu lovsangirnir í GT vóru skipaðir. Skipið *Nú takki Guði øll* á sama hátt?
2. Greiðið frá tveimum teimum seinastu reglunum í 1. ørindi.
3. Hvat merkir tað, at Guð er tríeinur?
4. Hvussu ljóðar bønin í endanum í sálminum?

Aðrar uppgávur:

1. Hyggið at onkrum av teimum áðurnevndu lovsangunum í GT ella NT.
2. Lýsið sálmin á skapandi hátt t.d. við myndum ella leiki.

37 Hvar Guð vil, glaður fari eg

Hvar Guð vil, glaður fari eg,
hann, ikki eg, skal ráða;
hann veit best sjálvur tíð og veg,
hann vil meg altíð náða.
Guð vil meg føra heim til sín,
tí er so tryggur hugur mín,
eg á hans miskunn líti.

2. Hvar Guð meg førir, vil eg meg
heilt geva í hans hendur;
eg veit, um mangan undrist eg,
í hond hans alt tó stendur.
Hann legði um meg síni ráð,
alt áðrenn dagsins ljós eg sá;
eg eigi meg ei sjálvur.

3. Hvar Guð meg førir, er í trúgv
og vón mín hugur tryggur;
hans kraft í mær skal hava búgv,
hann aldri av mær hyggur;
eg eigi tí so stórt frímóð,
tí Harrans leið er altíð góð,
ja víst hin allarbesta.

4. Hvar Guð vil, glaður fari eg,
um fótur mín skal brenna;
um eg ei sjálvur finni veg,
tilsíðst eg tó skal kenna:
Í trúskapi hann gjørdi alt,
øll míni spor hann hevur talt,
á hann eg trygt kann líta.

L. Gedicke 1711. J. Dahl 1927.
Lag: Sl. 154.

Harri, tú meg rannsakar og kennir. Hvørt eg siti ella standi, tú tað veitst, langt burtur mín ætlan er tær kunn. Hvørt eg gangi ella liggi, tú tað kannar, tú gjølla veitst um vegir mínar allar. Áður enn orðið er mær á míni tungu, tú, Harri, tað kennir til fulnar. Fyri aftan, fyri framman ert tú um meg, og hond tína hevur á meg tú lagt. Tað er mær ov undurfult at skilja, ov høgt, eg eri ei fyri tí førur. Hvar skal eg fara frá anda tínum, hvar skal eg flýggja frá ásjón tíni! Stígi eg til himna upp, tá ert tú har; reiði eg í helheimi legu mína, sí, tú ert har; lyfti eg mær á veingjum morgunroðans, setist eg við hitt ytsta hav, eisini har man hond tín meg leiða, og høgra hond tín mær halda! Um eg sigi: "Myrkrið meg hylji, og ljósið íkring meg verði nátt!" Tá er tó myrkrið tær ikki ov myrkt, og náttin er klár eins og dagur, myrkur og ljós eru jøvn fyri tær. Tí at tú hevur nýru míni gjørt, hevur meg vovið í móðurlívi! Eg tær lovi, tí á undurfullan hátt eg varð skaptur, undurfull verk tíni eru, og sál mín fullvæl tað veit. Bein míni vóru ei fyri tær huld, tá ið eg varð gjørdur í duldum, myndaður í jarðardjúpum. Forløg míni eygu tíni sóu, og í tína bók vórðu skrivaðir allir teir dagar, ið avmáldir vóru, áður enn nakar av teimum var til. Hvør torskilnar eru, Guð, mær hugsanir tínar, hvør miklar tær allar tilsamans! *139. Sálm,1-17*

Týska sálmaskaldið Lampertus Gedicke (1682-1735) skrivaði sálmin í 1711. Hans Adolf Brorson týddi sálmin til danskt í 1742. Brorson gav sálminum yvirskriftina *Om hjertets hengivenhed i Guds vilje*.

Skaldið yrkir um Guðs alvísu forsjón. Øll ørindini byrja við, *hvar Guð vil* ella *hvar Guð meg førir*. Ásannandi Guðs alvísa ráð kann menniskja liva trygt, tí Guð hevur longu lagt sínar ætlanir um tað, áðrenn tað var til, eins og fyri hansara tænarar í GT. Hetta førir eisini við sær, at vit ikki einans liva fyri okkum sjálvum. Vit kunnu ikki

liva og láta, sum okkum lystir. Og Guð er trúfastur og vil leiða menniskja gjøgnum jarðarlívið í vón og trúgv, ásannandi tað sama sum Paulus ápostul, at einaferð skulu vit kenna alt til fulnar: *Tí at nú síggja vit í spegli, í gátu; men tá skulu vit síggja andlit til andlits; nú kenni eg í pørtum, men tá skal eg kenna til fulnar, eins og eg eri til sjálvur til fulnar kendur*" *(1. Kor. 13,12)*

Uppgávur:

1. Les 139. Sálm,1-17 í Bíbliuni

2. Finn hvar *Hvar Guð vil glaður fari eg* og brotið úr sálminum úr GT líkjast.

3. Skriva í stuttum, hvørjar tankar tekstirnir vekja í tínum huga um:
   a) Guð og hansara leiklut í tíni tilveru?
   b) Guðs leiklut í heiminum í dag?

43 Tín miskunn, o Guð, er sum himinin há

1. Tín miskunn, o Guð, er sum himinin há,
tín trúfesti røkkur til skýggja,
tín dýrd er um allan heimin at sjá,
tín kærleikssól lýsir til bíggja.

2. Sum fastbygda fjallið er rættvísi tín,
sum havdýpið ráð títt og dómar,
tú bønirnar hoyrir, ið leita til tín,
tín hátign og dýrd um oss ljómar.

3. So víða sum menniskjan byggir sær ból,
tín náði og miskunn man vaka,
tín vernd er trygg eins og veingjanna skjól,
hjá tær okkum einki kann saka.

4. Tú sálirnar frelsir, tú fagnar hvørt kind,
hvørt kykt, her á fold dregur anda;
hjá tær er lívsins hin æviga lind,
sum ljósborgir glitrandi randa.

36. Sálmur , 6-10.
Ingemann 1845. J. Dahl 1911.
Lag: Sl. 335.

Til himlene rækker din miskundhed, Gud!
din trofasthed når dine skyer.
Din retfærdshånd over bjergene ud
er strakt over dale og byer.

Som himlenes favn er din kærlighed, Gud!
som havenes dyb dine domme.
Til frelsen fører du sjælene ud,
vil skabningens suk ihukomme.

Hvor dyrebar er dog din miskundhed, Gud!
hvor menneskebørnene bygge!
I mulm er kærligheds-vingen bredt ud,
vi skjule os under dens skygge.

Du kvæger i ørken den tørstende sjæl,
du bjærger den bævende due.
Hos dig er livets det evige væld,
og lys i dit lys skal vi skue.

Harri, sum himinin er miskunn tín há, trúfesti tín røkkur til skýggja!
Sum Guðs fjøll er rættvísi tín, dómar tínir sum havdýpið mikla!
Menniskju og djór tú frelsir Harri!
Hvør dýrmæt er, Guð, tín miskunn!
Undir skugga veingja tína søkja mannabørninin skjól!
Av fitini í húsum tínum tey verða mett,
tú teim gevur at drekka úr tínum yndisløkum,
tí hjá tær er lívsins kelda,
í tínum ljósi vær skoðum ljós!
36. Sálmur, 6-10

Um sálmin

Danska skaldið Bernhard Severin Ingemann (1789-1862) skrivaði *Tín miskunn, o Guð* í 1945, og er upprunin til sálmin hesin. Á garðinum Fredrikskilde við Sorø, har Ingemann var lærari, lá ein genta, Meta Nyegaard, sjúk av tuberklum. Tá á døgum var hetta ein ógrøðandi sjúka. Meðan hon var seingjarliggjandi, las Meta Nyegaard í Bíbliuni. Ein dagin las hon í Sálmunum í Gamla Testamenti, og hon kendi seg

troystaða av tí hon las. Serliga væl dámdi henni 36. Sálm. Meta Nyegaard skrivaði eitt bræv til Ingemann, sum kendi familjuna, og spurdi hann, um hann ikki vildi gera sálmin í Bíbliuni um til ørindi. Ingemann so gjørdi, og áðrenn Meta doyði í apríl 1845, sendi hann henni *Tín miskunn, o Guð*, sum Ingemann kallar ein troystarsálm. Sálmurin er ein enduryrking av miðpartinum av 36. Sálmi, ørindi 6-10. Byrjanin og endin av 36. Sálmi er um fallið hjá teimum gudleysu.

Miskunn og troyst

Vit kenna øll, hvussu tað er at vera sorgarbundin og bangin, og hvussu góð troystin kennist, tá ið hart leikar á. Tað kennist gott, tá ið vinir hjálpa, og tá ið vandin er av, kunnu vit aftur frøast. Alt kennist so lætt, og alt kring okkum sýnist at vera broytt - ljósið er bjartari, litirnir vakrari, menniskjuni blíðari, tónleikurin vakrari o.s.fr.

Í hesum sálminum roynir Ingemann á ein stillføran hátt at siga frá um Guðs kærleika og trúfesti móti okkum bangnu menniskjum. Guð hevur umsorgan fyri menniskjunum og bjargar teimum úr vanda og miskunnar og náðar teimum.

Uppgávur:

1. Tá ið ein tekstur verður fluttur í annað mál, kann tað vera torført at týða tekstin orð fyri orð. Í veruleikanum er talan um at flyta bæði innihald, form og kenslur til annan málbúna og aðra mentan. Samanber tann føroyska sálmin við tann danska sálmin. Finnur tú munir?

2. Sum áður sagt, so er íblásturin til sálmin at finna í 36. Sálma 6-10. Samanber *Tín miskunn, o Guð* (tann føroyska tekstin) við tekstin í 36. Sálmi. Hvar líkjast tekstirnir, og hvar líkjast teir ikki?

3. Ger eina yrking um ótta og troyst.

67 Eg vil mínum Harra prísa

1. Eg vil mínum Harra prísa,
sum syndir mínar allar bar,
í trúgv skal lov mítt rísa,
fyri honum mítt hjarta slær;
har vil eg navn hans skriva
og bera tað til mín deyð',
alt meðan eg her man liva,
hann linnar mær sorg og neyð.

2. Guð gevi mær tað at læra,
sum eg tað læra kann,
at dýrasti heiður og æra
skal veitast tær av kvinnu og mann';
Guð gevi mær tað í sinni
mínum Harra at lova væl,
um úti eg eri ella inni,
tú huga mín ugga skal.

3. Hann er eins og sólin klára,
sum lýsir hátt himni á,
hans náði man til mín strála,
hann hava skal á mær ráð;
hann eina kann sorgir stilla,
tað havi eg roynt hjá mær;
lat, Jesus, meg einki villa,
meg takka og tæna lat tær.

4. Teir himmalsku einglar í flokki
so fegnir teir tæna tær,
til tín stendur teirra tokki,
tín vilja teir ynda sær.
Gud setti teg av síni náði
alt við sína høgru hond,
gav tær so ríkið og ráðið
um øll somul heimsins lond.

5. Nú leiti eg til tína náði
og gevi meg tær í hond,
tú hava skalt meg í ráði,
meg leiða skulu tíni bond.
Ta stund, eg á foldum eri,
meg lívga skal trygdin tín,
títt orð eg sum skjøldur beri,
til tín stendur hugur mín.

6. O, Jesus, dagstjørnan bjarta,
sum ljós og lív mær er,
eg takki tær av hjarta
fyri ugga og aga frá tær.
Ger lutir mínar so reinar,
áðrenn eg skal dømast av tær,
sum gull og dýrastu steinar,
sum sólin so bjørt og skær.

7. O, Jesus, tú lívsins drottur,
tú hoyrdi nú, hvat eg bað!
Meg verja skal tín máttur,
tá altíð mær lundin gerst glað.
Tú send mær einglavernd tína,
tá eg hiðan sovna skal,
frels meg frá helvitis pínu,
før meg í himmiríkis sal.

Gomul donsk Mariuvísa.
Hans Thomissøn 1569. J. Dahl 1925.
Lag: Sl. 55.

Um sálmin

Eg vil mínum Harra prísa er upprunaliga ein gomul týsk Mariuvísa – *Jeg vil min Jomfru love* -, sum Hans Thomissøn (1532-1573) umyrkti og týddi til danskt í 1569. Sálmurin kom við í Den Danske Salmebog, sum Hans Thommisøn savnaði og gav út hetta sama árið. Hon var fyrsta veruliga danska Sálmabókin eftir siðaskiftið í Danmark í 1536.

Í seinmiðøldini vóru Mariuvísur nógv umhildnar í tí katólsku kirkjuni, og tað av tveimum grundum. Um hesa tíðina – riddaratíðina – bleiv Maria sett fram sum fyrimyndin hjá kvinnuni. Hon var bæði hin reina moyggin og móðirin. Tí fór kirkjan eisini undir at halda mariumessur sum t.d. kyndilsmessu 2. februar og boðanardag Mariu, sum er 5. sunnudagur í føstu. Hin grundin er, at um hesa tíðina vindur tilbiðjanin av halgimennum nógv upp á seg. Katólska kirkjan lærir, at eitt halgimenni er eitt menniskja, sum hevur livað eitt so fyrimyndarligt lív her á jørðini, at kirkjan kennir seg vísa í, at hetta menniskjað ikki einans er í himlinum, men eisini hevur eina serstøðu hjá Guði. Tí kunnu menniskjuni á jørðini biðja halgimennini ganga í forbøn fyri seg í himlinum, soleiðis at tey kunnu minna Jesus á teirra bønir. Maria verður hildin at hava eina serstøðu, tí hon er Jesu móðir og stendur honum næst. Hesa tíðina var tilbiðjanin av Mariu næstan sett í staðin fyri tilbiðjanina av Jesusi. Hon kundi m.a. troysta í sorg og hjálpa í neyð. Einglarnir tæntu henni, hon var friðskjól hjá syndarum og veitti náði á deyðastrá.

Hans Thomissøn sigur sjálvur, at hann einans hevur sett Jesu navn í staðin fyri Mariu, tá ið hann týddi sálmin *Eg vil mínum Harra prísa*.

Ein Kingosálmur

Eg vil mínum Harra prísa verður ofta tikin fram, tá ið talan er um kingosálmar. Kingosálmarnir vóru nýttir í Føroyum í uml. 200 ár frá 1700 til 1900, tó onkustaðni nógv longur. Orðið kingosálmur er eitt sindur misvísandi, tí Thomas Kingo hevur í mongum førum einki havt við sálmarnar at gera. Kingosálmar eru í veruleikanum danskir sálmar úr sálmabókini hjá Kingo ella øðrum gomlum sálmabókum, men sungnir við gomlum føroyskum løgum. Tað var sostatt tað eyðkenda lagið, sum gjørdi sálmin til ein kingosálm og ikki sálmurin.

Nógvir at teimum gomlu kingosálmunum verða enn nýttir, men hava tó fingið nýggj løg, ella er tað gamla kingolagið umskrivað og gjørt meira nýmótans og lættari at syngja. Av gomlum kingosálmum, sum enn verða nýttir, kunnu nevnast *Sum ígjøgnum sorta skíggja, Lov og tøkk og allan heiður, Rita navn títt mær í hjarta, Nú rennur sólin frí úr eysturlondum* og *Harmur og gleði í felag tey reika.*

Uppgávur

1. Greina sálmin eftir frymlinum
2. Umskriva sálmin til eina Mariuvísu. Hvussu broytir hetta sálmin?

Aðrar uppgávur

1. Lesið søguna **Orrustan í Klandurskoti** eftir M. A. Winther um skiftið frá kingoløgunum til tey nýggju løgini.
2. Hvat sigur søgan okkum um samfelagið og guðstrúnna?
3. Hví heldur tú, at fólk ikki vildu sleppa kingoløgunum?
4. Heldur tú, at fólk bera seg at á sama hátt í dag? Grunda svarið.

Orrustan í Klandurskoti eftir M. A. Winther er at finna í bókini *Ein skúladagur í K*, sum Jógvan Isaksen legði til rættis, Føroya Skúlabókagrunnur 1988.

82 Ver vælkomið, Harrans ár

1. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Jólanátt, tá Guðs orð fór í hold,
varð ljósið úr erva birt upp á fold.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

2. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Páskamorgun, tá Krist reis úr grøv,
tá sigraði lívið um lond og høv.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

3. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Hvítusunnu tá var tað so brátt,
at andin gav veraldar veikleika mátt.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

4. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Harrans ár, ið ger hjørtuni glað,
nú ber okkum gleði hvønn Harrans dag.
Vælkomið nýar! Væl vær fagnum tær.

Gamal danskur sálmur.
Grundtvig 1849. G. Bruun.
Lag: Sl. 361.

Um sálmin

Í 1849 skrivaði danski presturin Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) tveir sálmar við heitinum *Ver vælkomið Harrans ár*. Annar sálmurin er ein adventssálmur, nr. 82 í Sálmabókini. Hin sálmurin, nr. 532 í Sálmabókini, er ein nýggjárssálmur. Hugskotið til sálmarnar fekk Grundtvig frá soninum, Svend Grundtvig, sum vísti pápanum eina gamla danska fólkavísu, sum Grundtvig umyrkti fyrst til advenstssálmin, og síðani sama mánað umyrkti hann vísuna til ein nýggjárssálm.

Í adventssálminum yrkir Grundtvig um allar tær stóru kirkjuhátíðirnar, og hann greiðir eisini frá, hví vit halda jól, páskir og hvítusunnu, men hann gloymir ikki gerandisdagin og sunnudagin, tí ynskir hann fagnaðarboðunum – evangeliinum, sum ber okkum gleði hvønn Harrans dag, vælkomnum.

Uppgávur:

1. Greina *Ver vælkomið Harrans ár* nr. 82 eftir frymlinum
2. Hvat merkir adventstíðin?
3. Sálmurin umtalar tær stóru kirkjuhátíðirnar. Ger eina mynd av kirkjuárinum.
4. Ger eina mynd av álmanakkaárinum og samanber hana við myndina av kirkjuárinum.

Aðrar uppgávur

1. Les nýggjárssálmin nr. 532.

Nr. 532 Ver vælkomið, Harrans ár

1. Ver vælkomið, Harrans ár,
fegin fagna vit tær!
Sannleiks Guð, lat títt heilaga orð
vera ljósið og lívið hjá okkum í norð!
Vælkomið nýár, ver vælkomið her!

2. Ver vælkomið, Harrans ár,
fegin fagna vit tær!
Náðar Guð, lat títt sólskin í vár
oss veita á markini grøði í ár!
Vælkomið nýár, ver vælkomið her!

3. Ver vælkomið, Harrans ár,
fegin fagna vit tær!
Friðar Guð, gevi landinum við
til framgongd og bata tín lívssæla frið!
Vælkomið nýár, ver vælkomið her!

4. Ver vælkomið, Harrans ár,
fegin fagna vit tær!
Faðir-Guð, oss til gleði og gagn
lat nýárið líða í Jesu navn!
Vælkomið nýár, ver vælkomið her!

2. Finn í tekstinum, hvat tað er, sum ger nr. 532 til ein nýggjárssálm.
3. Hvar líkjast báðir sálmarnir?

103 Tað sótu seyðamenn á vakt

1. Tað sótu seyðamenn á vakt
og goymdu sínar smalur,
alt fylgið hevði stilt seg lagt,
ei lamb í líðum spælir,
sjálvt varnir hundar durva smátt,
í dølum valdar dimma nátt,
um heimin Harrans friður.

2. Tá lýsir bjart um fjallagrein,
og fram ein eingil trínur,
hans mál var milt, hans rødd var rein,
hans andlit fagurt skínur;
til hirðarnar hann talar so:
«Eg beri tykkum fagnarboð,
alt fólkið kann seg gleða.

3. Ein frelsari nú føddur er,
í dag til tykkum sendur,
hin Harri Krist hann navnið ber,
í Dávids stað - ókendur;
men prógv fullgott tit skulu fá:
í fjósi lágt á krubbustrá
eitt lítið barn tit finna.»

4. Brátt syngur einglaflokkur blítt:
«Halleluja, hosianna!
Guðs friður yvir verøld vítt!
Guðs tokki millum manna!
Og heiður veri himladrott'!»
Men hirðarnir sær skunda brátt
sín frelsara at skoða.

5. Takk fái fyri jólaboð,
tú einglaherur ljósi!
Takk, Guð, sum elskar okkum so!
Takk, barnið føtt í fjósi!
So lítillátin, Harri mín,
tú vart, - um heim nú heiður tín
ótaldar tungur bera.

6. Sum hirðarnir eg fara vil
mín frelsara at finna;
hans kærleiki mær hjálpir til
tann frið, ið eg vil vinna.
Hans jólaboð er besta troyst;
av syndaskuldum sál mín loyst
mót himli seg kann hevja.

Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 314.

Hirðarnir

Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: "Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu." Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: "Heiður veri Guði í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!"

Og tað hendi, tá ið einglarnir vóru farnir frá teimum aftur til himmals, tá søgdu hirðarnir hvør við annan: "Latum okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum."

Og teir fóru við skundi hagar og funnu bæði Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni. Og tá ið teir sóu tað, søgdu teir frá teimum orðum, sum talað høvdu verið til teirra um hetta barn. Og øll, ið hoyrdu tað, undraðust á tað, sum teimum varð sagt av hirðunum. Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum.

Og hirðarnir fóru avstað aftur, og teir lovaðu og prísaðu Guði fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir.

Luk. 2,8-20

Skaldið Mikkjal Dánjalsson á Ryggi (1878-1956) yrkti sálmin 25.12.1912. Íblásturin til sálmin er at finna í jólaevangeliinum, sum vit lesa tað hjá Luk. 2,8-20. Skaldið yrkir her um tann partin av jólaboðskapinum, tá hirðarnir fáa boð um, at Jesus er føddur. Hann sigur frá um eingilin, sum ber boðini, um einglafjøldina, ið sang lovsong, og um hvussu hirðarnir fara at finna frelsaran. Skaldið endar við bønini, at vit og hann, eins og hirðarnir, fara at finna frelsaran fyri at lovsyngja honum.

Uppgávur

1. Lesið tekstin hjá Lukasi.
2. Samanberið sálmin við tekstin hjá Lukasi. Hvat hevur skaldið nýtt úr tekstinum?

Aðrar uppgávur:

1. Mikkjal á Ryggi hevur eisini skrivað stuttsøguna, *Friður á jørð*, les søguna.
2. Hví kallar Mikkjal á Ryggi søguna *Friður á jørð*?
3. Samanber sálmin og søguna. Hvønn líkskap finnur tú, og hvat heldur tú, skaldið vil strika undir við hesum líkskapi?
4. Hvat kemur tær í huga, tá ið tú hoyrir orðini: Friður á jørð?

Søgan *Friður á jørð* er at finna í *Mikkjalsbók*, ið Heini F. Petersen og Jákup Reinert Hansen løgdu til rættis, Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út í 1994 (bls. 113-121).

123 Dýrasti Jesus

Dýrasti Jesus,
drottur alla drotta,
sonur av Guði og Mariu moy,
teg vil eg elska,
teg vil eg æra,
tú lív mítt ert, mín dýri eyð'.

2. Føgur er ongin,
fagrari er lundin,
tá hon á vári setur blað;
Jesus er fagrari,
Jesus er reinari,
hann okkum hjørtuni ger glað.

3. Bjart lýsir sólin,
mildari er mánin,
glógvandi himmalsins stjørnulind;
meir ljómar Jesus,
meir lýsir Jesus
enn himmalsins øll glæstrimynd.

4. Yndig er blóman,
vakrari er menniskjan,
meðan ið frískt er ungdómsins vár;
blóman má følna,
menniskjan vikna,
men Jesus elda eingi ár.

5. Alt, sum á himni
og á jørð er fagurt,
lænir sær ljóma og dýrd frá tær,
Jesus, vit biðja,
okkum tú eigi,
hvørt okkum leiði fótafar!

Gamal týskur songur. J. Dahl 1925.
Lag: sum Sl. 78.

Dýrasti Jesus er ein gamal týskur sálmur, sum Jacob Dahl (1878-1944) týddi í 1925. Í sálminum verður Jesus borin saman við skapanarverkið. Skapanarverkið er stórbært, men niðurstøðan er púra greið: Einki her á jørð kann samanberast við Jesus, sum her verður lýstur bjartari enn sólin og mildari enn mánin og himmalsins glæstrimynd.

Uppgávur

1. Greinið sálmin eftir frymlinum.
2. Danska skaldið B.S. Ingemann hevur nýtt sama týska sálmin sum íblástur til sín kenda jólasálm *Føgur er foldin,* lesið ella syngið sálmin

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Føgur er foldin

1. Føgur er foldin,
dýrdarríkur himin,
sæl er sálanna jorsalferð,
um allan heimin,
um allar ævir
tað syngjandi at himni ber.

2. Øldirnar fara,
øldir munnu koma,
ætt eftir ætt søkkur undir
mold.
Onga tíð tagnar
ljóðið av himni,
sum gleðir sálir her á fold.

3. Einglar tað kvóðu
jólanátt for hirðum,
mann eftir mann hoyrdist sama lag:
Friður á foldum,
menniskja, frø teg,

3. Samanberið *Dýrasti dráttur* og *Føgur er foldin.* Hvar líkjast teir, og hvar líkjast teir ikki?
4. *Føgur er foldin* verður ofta sungin til jarðarferð. Hví man sálmurin vera nýttur í hesum høpi?

174 Heilur, frelsari og Kristur!

1. Heilur, frelsari og Kristur!
Verðin teg við tornum ristir.
Tú sært, eg mær havi hættað
rósukrans um kross at flætta.
Gev mær til tað makt og mót!

2. Hví komst tú av himni høga
fyri vára synd at bløða,
legði burt tín guddómsleika,
fann á fold tín bróður veika,
og gav honum sjálvan teg?

3. Kærleikslogi tín og megi
lýsa bjart á nátt og degi,
hugur tín er gávuríkur,
fyri deyða ei tú víkur,
fer tí lýðin krossins veg.

4. Nú eg kenni, áður dulda,
harðskap mín og hjartakulda.
Rann av heimi nakað virði,
nevnivert at latið fyri,
frelsari, tín kærleika?

5. Tó úr tíni benjarkeldu
spratt ein á við makt og veldi,
sum kann klúgva klettin harða,
sum kann bræða ísin glæra,
sum kann hjartað tváa reint.

6. Góði Guð, lat hendur tínar
veita inn í æðrar mínar
ánna, sum kleyv klettin harða,
sum kann bræða ísin glæra,
sum kann blóðsøk tváa av!

7. Tú, sum hevur teg mær givið,
gævi, at í tær eg livi,
búgv í mínum hjarta inni,
so tú mær í sál og sinni
er hin trygga akkersgrund.

8. Tó eg skal sum blóman følna,
barmur mín og hond skal kólna,
trúgvi eg, tín hond meg hevur
og í deyða lív mær gevur,
tú breyt deyðans beiska brodd.*

9. Nú er krossins gáta rós mítt,
frelsari, lat náðarljós títt,
lýsa mær á lívsins vegi,
leiða meg á deyðadegi
heim í paradís við tær.
** 1 Kor 15,55.*

Arnulf úr Louvain 1250. Grundtvig 1837.
R. Lenvig 1986.
Lag: Sl. 131.

"Deyði, hvar er sigur tín? Deyði, hvar er broddur tín?" 1 Kor. 15,55.

Ein miðaldarmunkur syngur um krossin

Um ár 1200 livdi munkurin Arnulf úr Louvain í einum klostri í Belgia. Tað var í føstuni, og fólk gjørdu seg til reiðar at hátíðarhalda páskirnar. Tey fastaðu og bóðu. Eins og aðrir munkar sat Arnulf úr Louvain einsamallur í kliva sínum, bað og grundaði yvir skriftirnar. Hetta var ein partur av gerandislívinum og halganini hjá munkunum. Munkarnir grundaðu djúpt (mediteraðu), so teir kundu fáa lut í tí loyndarfulla í Guðs frelsisætlan og gerast eitt við Guð. Dag eftir dag sat hann og hugdi at Kristmyndini (krucifiksinum) við Jesu pínda likami á. Stillur sat hann har

morgun og kvøld og royndi at liva seg inn í Jesu sár og líðingar. Fyrst hugdi hann at fótunum við naglamerkjunum, síðani helt hann fram og hevjaði eyguni og endaði við tornakrýnda høvdið.


Sum dagarnir gingu, kendi munkurin, at Jesu líðingar gjørdust hansara, og fyri at minnast bønina skrivaði hann eina yrking á latíni. Yrkingin var um Jesu líðingar í teimum sjey likamspørtunum. Fyrsta ørindið er um føturnar, annað ørindið er um knøini, og síðani koma hendurnar, sárið í síðuni, bringan, hjartað og andlitið.

Í 1837 kom N.F.S. Grundtvig (1783-1872) fram á yrkingina og nýtti hana sum íblástur til *Heilur frelsari og Kristur*, sum tó gjørdist ein heilt onnur yrking. Grundtvig hyggur eisini at Jesu sárum og líðingum, men á ein heilt annan hátt. Eins og Arnulf úr Louvain undraðist Grundtvig alt lívið á krossins gátu: At Guð í Jesusi gjørdist menniskja, og at hann leið krossdeyðan fyri menniskjuni.

Uppgávur:

1. a) 2. ørindi: Hvat undrast yrkjarin á har?
   b) Hvørjar gjørdust avleiðingarnar av, at Jesus legði burt sín guddómleika?
   c) 5. ørindi: *Tó úr tíni benjarkeldu, spratt ein á við makt og veldi*, hvat meinar skaldið við her?
   d) 6. ørindi: Hvør ella hvat er áin?
   e) 9. ørindi: Hvør er krossins gáta?
   f) Hvat sigur yrkjarin um krossins gátu?

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008



Krossfestingin av Matthiast Grünewald frá uml. 1524
http://www.ibiblio.org/wm/paint/auth/grunewald/
http://www.abcgallery.com/G/grunewald/grunewald.html

2. a) Hugsa tær, at tú ert Arnulf úr Louvain. Hygg at myndini og greina hana. Hvat sært tú?

   b) Hvat av myndini finnur tú aftur í sálminum?

3. a) Hvørjar líðingar í nútíðini kemur tú at hugsað um, tá tú hyggur at myndini?

   b) Hvør hevur ábyrgdina av teimum líðingunum?

   c) Hvat kunnu vit gera við líðingarnar á okkara døgum?

Samrøðuevni:
Halda tit, at Jesu líðing kann samanberast við líðingarnar, okkum eru fyri? Grundið svarið.

179 So stillan Jesus gongur

1. So stillan Jesus gongur
fram til sín svára dag,
um yvir honum hongur
eitt døkt og krossað træ.

2. Um guddómsvitskan sigur
frá krossi og frá neyð,
til alt hann tolin tigur
og vil, sum Harrin beyð.

3. Við fríum, reinum sinni
hann móti deyða fer,
men veit tað innast inni,
at ferðin sigur ber.

4. Her er hann, sum vil loysa
úr syndum teg á mál,
her er hann, sum vil oysa
tær troyst í rædda sál.

5. Her er hann, teg vil eiga,
ein góðska heil og góð,
her er hann, teg vil leiða,
tí má hann sveitta blóð.

6. Má tindakrúnu bera
og dapurt háðarlín,
so fegin vil hann vera
um ævir drottin tín.

7. O, Jesus, um eg kundi,
sum eg so fegin vil,
tær heiðurskransar bundið,
tað hjálpi tú mær til.

8. So fegin klæði míni
eg breiði á tín veg,
í tøkk við hinum tríni,
sum vilja elska teg.

9. Eg beri mínar pálmar,
tær Harri Jesus Krist,
og syngi mínar sálmar,
tú hoyrir teir so vist.

10. Várt hosianna ljóði,
tit einglar syngið við:
Vinn deyðan, Jesus góði,
vinn okkum lív og grið.

Kingo 1689.
Elsa Bærentsen.
Lag: Sl. 295.

Jesus ríður inn í Jerúsalem

Og tá ið teir nærkaðust Jerúsalem og komu til Betfage við Oljufjallið, tá sendi Jesus tveir lærusveinar undan og segði við teir: "Farið í bygdina her beint framman fyri tykkum, og brátt munnu tit finna eitt ásin standa bundið og eitt fyl hjá tí; loysið tey og leiðið mær tey higar. Og um onkur sigur nakað við tykkum, so skulu tit siga, at Harranum tørvar tey; tá man hann alt fyri eitt lata tey avstað." Men hetta hendi, til tess at tað skuldi ganga út, sum talað er av profetinum, tá ið hann sigur: "Sions dóttur berið tit boð: Sí, kongur tín til tín kemur, lítillátur, á asna hann ríður, á ungum klyvjadjórs fyli." Men lærusveinarnir fóru avstað og gjørdu, sum Jesus hevði boðið teimum; og teir komu við ásininum og fylinum og løgdu klæði síni á tey, og hann setti seg oman á tey. Men flest øll av mannamúgvuni breiddu klæði síni á vegin, og summi brutu greinar av trøunum og løgdu á vegin. Men mannamúgvurnar, sum gingu undan honum og sum gingu aftaná, rópaðu og søgdu: "Hosianna, Dávids sonur! Vælsignaður veri tann, ið kemur í Harrans navni! Hosianna í hægsta himli!" Matt.21,1-9

Føstusálmarnir hjá Kingo

Danski presturin, Thomas Kingo (1634-1703), skrivaði sálmin í 1689. Sama árið skrivaði hann fleiri passiónsálmar hvønn eftir annan. Hann skrivaði í veruleikanum sálmar til alla føstuna og páskirnar. *So stillan Jesus gongur* er skrivaður til pálmasunnudag, sum er inngangurin til stillu vikuna. Íblásturin fekk Kingo úr Matt. 22,1-9, tá ið Jesus ríður inn í Jersusalem.

Við yrking síni vildi Kingo vísa á, hvussu dýrt goldin frelsan var, og hvat hon hevur at týða fyri tað einstaka menniskjað í tí dagliga lívinum. Kingo hevði evnini til at mála myndir við orðum, so tá ið vit syngja sálmarnar, síggja vit hendingarnar fyri okkum. Ein av grundunum, til at sálmarnir kennast so livandi, er, at Kingo ofta yrkir í nútíð.

Uppgávur:

1. Skriva eitt ørindi av sálminum um frá nútíð til tátíð.
2. Hvat hendir við einari tílíkari umskriving?
3. Finn tað ørindið í sálminum, sum tær dámar best, og sig hví tú heldur so.
4. Samanber sálmin við bíbliutekstin. Hvat úr tekstinum hevur Kingo nýtt í sálminum?

Aðrar uppgávur

Gerið tekstin um til ein leik, ella hugsið tykkum, hvussu tit vildu gjørt sálmin til film.

Kingo skrivaði 17 langar føstusálmar (pínslusálmar) við sama ørindslagi og til sama lag (*Sum ígjøgnum sortar skýggja).* Hesir sálmarnir vóru ætlaðir til føstugudstænasturnar. Í sálmunum fylgja vit Jesusi – fót fyri fót – á hansara ferð, frá tí at hann og lærusveinarnir vóru lidnir at eta páskalambið skírishóskvøld til páskamorgun, tá ið Jesus reis av deyða. Av pínslusálmunum hjá Kingo er eittans ørindi at finna í Sálmabókini, tað er 15. ørindið í

Rita navn títt mær í hjarta,
Jesus, kongur mín og Guð,
at ei sól, ei myrkur svarta
megna teg at máa út!
Hetta innsigl' á meg set:
Jesus mín úr Nasaret,
hann, ið krossin mátti bera,
mær til sálargagn skal vera.

Kingo 1689. Gunnar Dahl-Olsen. Lag: sum Sl. 183 b.

sálminum til langafríggjadag: *Bryder frem i hule sukke*. Í Sálmabókini eitur ørindið *Rita navn títt mær í hjarta.*

1. Syngið *Rita navn títt* við upprunalagnum (lagnum á *Sum ígjøgnum sortar skýggja*). Síðani nýta vit eitt annað lag til ørindið (tað, sum verður nýtt í dag). Halda tit, at lagið ávirkar huglagið, tá ið vit syngja ørindi?
2. Hetta sálmaørindið hevur verið/er nýtt til mangt og hvat, t.d. tá ið fólk kenna seg at vera í trongstøðu ella í sambandi við jarðarferð, tá ið líkið verður borið út úr heiminum ella kirkjuni. Hví halda tit, at hetta ørindið verður nýtt í hesum høpi?

195 Deyði hvar er nú broddur tín?

1.Deyði, hvar er nú broddur tín?
Helviti, hvar er tín sigur?
Risin er aftur frelsari mín,
áður í grøv lagdur niður.
Roðar nú páskasól um fjøll,
vermir og gleðir hjørtu øll!
Tøkk havi Guð fyri lívið!

2. Lívsleiðin er ei meira tung;
livandi Jesus meg leiðir;
bæði hann styðjar gomul og ung,
breytina fyri teim greiðir.
Fylgir hann við á míni ferð,
einki mær tá til skaða er.
Tøkk havi Guð fyri lívið!

3. Songur tí berst um lond og høv
um páskaboðskapin bjarta,
fagurt hann ljóðar við opna grøv
inn í tað trúgvandi hjarta:
«Risin av grøv er frelsari mín,
deyði, hvar er nú broddur tín?»
Tøkk havi Guð fyri lívið!

1 Kor 15,55. Fr. Petersen 1900.
Lag: Sl. 30 ella sum Sl. 186

Frederik Petersen, próstur, (1878-1944) yrkti sálmin í 1926. Tað man eingin ivi vera um, hvaðani Fr. Petersen hevur fingið íblásturin til sálmin, nevniliga úr 1. Kor.15, har Paulus talar um Jesu uppreisn.

Skaldið spyr, eins og Paulus ápostul spyr í 1. Kor.15 *Deyði, hvar er sigur tín? Deyði, hvar er broddur tín?* Og eins og Paulus kemur hann til ta niðurstøðu, at deyðans broddur er brotin, tí frelsarin er staðin upp frá deyðum. Tessvegna er menniskjans lívsleið ein onnur nú *Bæði hann styðjar gomul og ung, breytina fyri teim greiðir.* Lovsangurin um hin upprisna frelsaran ljóðar til øll, og tí kunnu øll syngja við *Tøkk havi Guð fyri lívið!*

“Deyði, hvar er sigur tín? Deyði, hvar er broddur tín?” 1.Kor. 15,56

Men broddur deyðans er syndin, og máttur syndarinnar er lógin. 1.Kor. 15,57

Men tøkk veri Guði, sum gevur okkum sigurin við harra várum, Jesusi Kristi! 1.Kor. 15,57.

Uppgávur:

1. Hvat, sigur Paulus, er broddur deyðans (1.Kor. 15,56)?
2. Hví sigur Paulus, at broddurin er gjørdur til einkis (1.Kor. 15,57)?
3. Hvat sigur Fr. Petersen um deyðans brodd, og hví sigur hann hetta?
4. Hesin sálmurin kann syngjast við fleiri løgum. Sálmurin verður m.a. sungin við sama lag, sum vit nýta til *Kirkjan hon er eitt gamalt hús*. Syngið fyrst sálmin við hesum lagnum, syngið síðani sálmin við lagnum, sum H. J. Højgaard gjørdi til sálmin.
5. Halda tit, at huglagið (stemningurin) í sálminum ávirkast av lagnum?

Aðrar uppgávur:

Jesu uppreisn

Men eftir hvíludagin, tá ið tók at lýsa av fyrsta degi í vikuni, komu Maria Magdalena og hin Maria út at hyggja eftir grøvini. Og sí, tá varð landskjálvti mikil, tí at eingil Harrans kom niður av himli og steig fram og velti steinin frá og setti seg á hann. Men útsjón hansara var sum snarljós, og klæði hansara hvít sum fonn. Men vaktarmenninir skulvu av ræðslu fyri honum og vórðu sum deyðir. Men eingilin tók til máls og segði við kvinnurnar: “Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita. Hann er ikki her, tí at hann er risin upp, sum hann hevur sagt. Komið higar og síggið staðin, har sum Harrin lá! Og skundið tykkum og farið og sigið lærusveinum hansara: Hann er risin upp frá deyðum; og sí, hann fer undan tykkum til Galileu; har skulu tit síggja hann! Sí, eg havi sagt tykkum tað.« Og tær fóru í skundi burtur frá grøvini við ótta og miklari gleði, og tær runnu at bera lærusveinum hansara boð um hetta. Og sí, Jesus kom ímóti teimum og segði: “Heilar og sælar!” Men tær fóru til hansara og fevndu um føtur hansara og tilbóðu hann. Tá segði Jesus við tær: “Tit mega ikki ræðast! Farið og boðið brøðrum mínum, at teir skulu fara avstað til Galileu, og har skulu teir síggja meg.” Matt. 28,1-11

1. Her lesa vit um Jesu uppreisn. Hvussu verður Jesus lýstur? Sum ein kongasonur, sum eitt vanlig menniskja ella nakað heilt annað. Grunda svarið.
2. Hví heldur tú, at lærusveinarnir og kvinnurnar høvdu ilt við at trúgva Jesu uppreisn?
3. Í dag syngja vit sigurssálmar um Jesu uppreisn. Sungu Jesu lærusveinar sigursálmar tær fyrstu páskirnar? Grunda svarið.
4. Hvussu samsvarar huglagið í sálminum við frásøgnin hjá Matt.?

198 Sum ígjøgnum sortar skýggja

1.Sum ígjøgnum sortar skýggja
kemur fram hin gylta sól,
so at bølmyrkur má flýggja,
lýsir í um tind og hól,
so úr grøv upp Jesus stóð
og úr djúpum deyðans sjó,
vann á døprum deyðaváða
árla í páskamorgunroða.

2. Tøkk, o, sigurskappi sterki,
tøkk, o, himinhetja góð,
at tú framdi avreksverkið,
heljarlokur sundur sló,
tøkk, at tú til lívs breyt veg,
deyðan feldi undir teg;
slík er tunga ei at finna,
sum ta gleði kann at inna.

3. Djúpt eg kenni mær í barmi,
at tað ugga ber til mín,
lættir mær av tungum harmi,
tá eg minnist gravstað tín,
hugsi um tað, at tú lá
har í deyðans dimmu vrá,
men reis upp við dýrd og megi,
kann tað vera størri gleði!

4. Liggi eg á syndavegum,
liggi eg á armóðsstrá,
liggi eg á sjúkalegum,
liggi eg í eymd og háð,
liggi eg sum lasafar,
ongan góðan eigi mær,
skal eg so til moldar fara,
vónin mín tó við skal vara.

5. Deyði, synd, alt ørvameingi,
sum hin versti skjóta kann,
stukku av í tínum fangi,
har sum hvíld í grøv tú fann,
har tú søkti tey í kav,
men gav mær ein trygdarstav,
at eg tær má heiður gera
og skal sigurspálmar bera.

6. Tú til lívs meg upp skal vekja,
tað er tín uppreisnar náð;
lat tey leiðið um meg tekja,
lat meg verða maðka bráð,
lat mær gloypa eld og sjógv,
eg í trúgv tó og í rógv
doyggi, tí úr deyðans londum
bjargist eg av tínum hondum.

7. Góði Jesus, veit mær náði
og lat halga anda tín
vera hjá mær, so eg ráði
slíkan allan lívshátt mín,
at eg meir ei nakra tíð
deyðadjúpið falli í,
sum tú sjálvur úr meg ripti,
tá tú deyðan niður syfti.

Kingo 1689. J. Dahl 1924.
Lag: Sl. 307 a og b.

Um sálmin

Danski presturin, Thomas Kingo, (1634-1703) skrivaði sálmin í 1689, og kann hann roknast sum endin av teim 17 pínslusálmunum, hann skrivaði hetta árið. Nógv bendir á, at Kingo var ikki sjálvur greiður yvir dygdina í hesum sálminum, sum gjørdist fólkaogn og gav nógvum øðrum skaldum íblástur. Grundvig helt t.d. so nógv um sálmin, at hann nýtti hann fleiri ferðir sum íblástur til sínar sálmar.

Sálmurin kom við í Kingosálmabókina og varð settur til 2. páskadag. Upprunaliga hevði sálmurin 10 ørindi. Hann er nakað broyttur gjøgnum tíðina, tí málið, Kingo nýtir, kann vera torført at skilja hjá nútíðar menniskjum. Eisini er sálmurin styttur, og í føroysku umsetingini hevur hann 7 ørindi, meðan hann hevur 8 ørindi í donsku Sálmabókini. 10. ørindi stendur sum einstakt ørindi í Sálmabókini undir heitinum *Fyri halgu føðing tína.*

Sálmurin spennir víða, heilt frá tí kvalafulla langafríggjadegi til uppreisnardýrdina páskadag. Sálmurin er ein sigurssálmur, sum tó ongatíð gloymir, hvat sigurin kostaði, og hvør eigur heiðurin. Eins og vanligt er við morgunsálmunum hjá Kingo, so byrjar eisini hesin við einari stórbærari huglagsmynd (stemningsmynd): Sólin tekur at skína gjøgnum tey myrku skýggini í øllum sínum veldi. Á sama hátt reis Jesus upp páskamorgum, og tað er størsta sólarris, heimurin hevur sæð. Tá varð størsti sigurin nakrantíð vunnin á myrkursins maktum, soleiðis at menniskja hereftir skal liva í ljósinum av uppreisnarveruleikanum. Kingo gloymir ikki, at eisini í mannalívinum finst mótgangur og líðing, men uppreisnarveruleikin, at Kristus er uppstaðin, ger tað hóast alt gott at vera menniskja. Jesus Kristus hevur tikið skyldina hjá menniskjanum á seg og soleiðis vunnið deyða mín!

Fyri halgu føðing tína,
fyri signað lívsins orð,
fyri verk, ið fagurt skína,
fyri skírn og náðarborð,
fyri deyðans kalda blund,
fyri sælu páskastund,
allan aldur tøkk tær ljóði,
Jesus, sálar vinur góði.

Kingo 1689. J. Dahl.

Tíggjunda ørindi av sálminum

Uppgávur:

1. Greinið sálmin eftir frymlinum.
2. Kingo nýtir mótsetningar fyri at fáa eina klára mynd fram. Hyggið at 1. ørindi. Hvussu fær Kingo myndina fram?

3. Hvat vil Kingo siga við 4. ørindi?
4. Hesin sálmurin hevur gjøgnum tíðina verið mettur sum ein av teimum fremstu páskasálmunum ikki einans í Danmørk, men eisini her á landi. Hví man hesin sálmurin hava fingið hesa serstøðu?
5. Fyrr var vanligt at syngja 10. ørindi (á donskum sjálvandi) við jarðarferðir, og tá bleiv ørindið sungið beint eftir, at prestur hevði kastað jørð á grøvina. Hví mundi júst hetta ørindið verða sungið?
6. Um tit hava høvi til tess, lurtið so eftir sálminum, meðan hann verður sungin við kingolagi.

Aðrar uppgávur

1. Tvær myndir eftir Mikines: I (deyði og sorg) og II (gleði)
   a) Hygg at myndunum og skriva niður:
   b) Hvørjar tankar fært tú um mynd I?
   c) Hvørjar tankar fært tú um mynd II?
   d) Hvørjar tankar fært tú um lívið sum heild, tá tú sært myndirnar?

2. Lýs á skapandi hátt eins og Kingo við mótsetningum
   kærleika og hatur ella sorg og gleði.



Mynd I Saknur
http://www.art.fo/en/faroese_artists/samuel_joensen_mikines.php



Mynd II Føroyskur dansur
http://heima.olivant.fo/~mykines/artdans.htm

229 Nú skínur sól í dýrd og mæti

1. Nú skínur sól í dýrd og mæti
- lívsljós av Harrans náðisæti -
nú kom Guðs náð so mild og blíð
og so hin væna summartíð;
nú spáar meir enn einglareyst
í Jesu navni valaheyst.

2. Ta løtu, summarsólin setur,
so fróur títlingurin letur;
og alt, sum Harrin kannar sær,
fær søtan svøvn, - tí hann er nær,
fær sælan dreym um paradís
og vaknar til Guðs lov og prís.

3. Guðs signing yvir dustið andar
eitt heimligt lag frá fjall' til strandar,
av yndi angar undir ský
úr paradís dýrdmetan ný,
og vakurt fer í ong avstað
úr lívsins flóð eitt kelduvað.

4. Tað veldur andin, sum her dalar,
tað virkar andin, sum her talar
Guðs orð til troyst og sálarbót
av kærleika og sannleiks rót
í navni orðsins, sum varð hold
og fór til himmals undan mold.

5. Kom, syngið andans prís og æru
nú jarðarríkis mannaskari.
Úr hvørji ætt, hvørt tungumál
syng takkarsong av hug og sál.
Í Harrans húsi, heimi, høll
syng' takkarsong av huga øll.

6. Í Jesu navn' tá andans tala
fær jødar, heidningar at mæla
og koma undir Jesu hond
øll móðurmál um heimsins lond;
tá ljóðar út úr bygd og bý
halleluja um alla tíð.

7. Guð faðir vár! Tá verður frøi;
tá ríki títt vil kenna grøði,
sum sólin ferðast vit hvønn dag
í Jesu Kristi dýrdarstað.
Tí, tá eg gav tær hjartað, Guð,
við honum fekk eg himnalut.

Grundtvig 1843.
Rólant Lenvig.
Lag: Sl. 251.

Um sálmin

Danski presturin Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) yrkti sálmin í 1843. Vit vita einki um í hvørjum høpi, sálmurin varð yrktur. Men eins og nógvir aðrir sálmar hjá Grundtvig bleiv hesin sálmurin broyttur nakrar ferðir. Grundtvig hevði tað fyri, at hann kundi umarbeiða ein sálm fleiri ferðir, áðrenn hann var nøgdur. Teksturin í Sálmabókini er frá 1853.

Sum í mongum øðrum sálmum setur Grundtvig í hesum sálminum náttúrulýsingar upp móti lýsingum av Guðs ríkið fyri at fáa boðskap sín fram. Sálmurin byrjar sum ein summarsálmur, men longu í aðru reglu síggja vit, at Grundtvig vil annað og meira: *Nú skínur sól í dýrd og mæti - lívsljós av Harrans náðisæti - nú kom Guðs náð so mild og blíð og so hin væna summartíð.*

Grundtvig samanbar ofta páskirnar við várið, og her samanber hann hvítusunnuna við summarið. Vit lesa um sólina, sum skínur frá Harrans náðisæti. Jesus verður ofta samanborin við sólina og náðisæti, eisini nevnt náðistólurin, ið er eitt hugtak frá Lutheri. Hann kallaði lokið á sáttmálaørkini, sum stóð í tjaldtemplinum fyri náðistólin. Ísraels fólk mettu sáttmálaørkina sum Guðs hásæti millum teirra. Og við Jesusi var ein nýggjur náðisáttmáli gjørdur fyri øll fólk.

Grundtvig syngur um lívsljósið, sum strálar frá Guðs náðisæti. Signingin, sum kemur út frá Guði, lívgar alt á jørðini. Andans virki boðar frá ljósum góðum tíðum við vøkstri og gróðri í Guðs kirkjuliði. Guðs andi birtir lív og fær jødar og heidningar at tala og samlar øll fólkasløg undir Jesu hond, og fólk gleðast og lovsyngja Guði: *Tí, tá eg gav tær hjartað, Guð, við honum fekk eg himnalut.*

Uppgávur:

1. Greina sálmin eftir frymlinum.
2. Les tekstin um fyrstu hvítusunnuna í Áps. 2,1-13.

Hin fyrsta hvítusunna

Og tá ið nú hvítusunnudagurin var komin, vóru teir allir saman komnir á einum staði. Og tá kom brádliga eitt dun av himli, sum tá ið harðveður brestur á, og fylti alt húsið, sum teir sótu í. Og fyri teimum sýndust tungur líkasum av eldi, sum skildust sundur og settust á ein og hvønn teirra; og teir vórðu allir fyltir av hinum heilaga anda og tóku at tala á øðrum tungumálum eins og andin gav teimum at mæla. Men har vóru Jødar búsettir í Jerúsalem, menn, ið óttaðust Guð, av øllum tjóðum undir himni. Tá ið nú hetta ljóðið hoyrdist, kom mannamúgvan saman, og henni varð dátt við; tí at teir hoyrdu, ein og hvør, teir tala á sínum egna máli. Og teir vórðu allir bilsnir og undraðust og søgdu: "Sí, eru ikki allir hesir, ið tala, Galileumenn? Hvussu ber tað tá til, at vit, ein og hvør, hoyra teir tala á okkara egna máli, sum vit eru føddir við? Partar og Medar og Elamitar og vit, sum eru búsettir í Mesopotámiu, Júdeu, Kappadókíu, Pontus og Ásiu, í Frýgíu og Pamfýliu, Egyptalandi og Libyubygdunum við Kýrene, og vit Rómverjar, sum her hava setst niður, Jødar og proselýtar; Kretoyingar og Árábar, vit hoyra teir tala á okkara tungum um stórverk Guðs?" Men teir gjørdust allir bilsnir og vóru í døpurhuga og søgdu hvør við annan: "Hvat man hetta vera?" Men aðrir spottaðu og søgdu: "Teir eru druknir av søtum víni." Áps. 1,1-13

3. Hvar heldur tú, at sálmurin og teksturin úr NT líkjast?
4. Royn í stuttum at greiða frá halga andans virki sambært sálminum?

255 Vár Guð er føst og haldgóð borg

1. Vár Guð er føst og haldgóð borg,
har vit væl vardir standa,
hann hjálp vár var í hvørji sorg,
vár vernd í hvørjum vanda;
nú fjandin vreiður er
og fram við grimdum fer,
hann roynir svikaráð
og okkum herjar á,
ei finst á jørð hans líki.

2. Vár egin kraft so lítil er,
at brátt berst tap í hendi;
men ein í stríð við okkum fer,
sum Guð við veldi sendi.
Tað Harrin Jesus er,
ið ein av øllum ber,
ei annar Guð er til,
hann okkum hjálpa vil,
hann víst man valin halda.

3. Um djevlum uddi verøld í,
sum okkum vildu týna,
vit óttast ongan vanda, tí
teir sjálvir skulu dvína;
um myrkurs púki vil
alt illmegn leggja til,
hann einki vinna man,
tí áður dóm fekk hann,
eitt orð kann brátt hann fella.

4. Hvør fíggindi skal ótøkk fá,
hvørt orð várs Guðs skal standa,
tí Harrin gongur okkum hjá
við hjálp og halgum anda.
Og taka teir várt lív,
fæ, frælsi, barn og vív,
í Guðs frið, hvussu fer,
tað teimum gagn ei ger,
Guðs ríki okkum ognast!

46. Sálmur . Martin Luther 1529. J. Dahl.
Lag: Sl. 354.

Um sálmin

Í byrjanini av 1500 talinum var latín kirkjumálið burturav. Alt annað enn prædikan fór fram á latíni. Sjálvt um vanliga kirkjufólk ikki skilti eitt orð av tí, sum varð sagt, vóru børnini doypt á latíni, presturin las á latíni úr Bíbliuni, og altargongdin fór eisini fram á latíni. Sálmarnir vóru somuleiðis á latíni og vóru einans sungnir av kirkjukórinum. Tað vanliga kirkjufólkið slapp ikki at syngja við. Har sótu tey so og fingu ikki altíð nógv við av tí, ið fór fram í kirkjuni.

Um nýggjársleitið í 1524 skrivaði týski presturin Martin Luther (1483-1546) til ein vinmann, at hann ætlaði at útvega fólkinum týskar sálmar, so at Guðs orð á tann hátt kundi festa seg í fólkasálina við sanginum. Luther royndi at finna yrkjarar, men striltið gekk, tí antin dugdu teir ikki, ella tordu teir ikki. Tað var heldur ikki gamansleikur at seta seg upp móti tí katólsku kirkjuni og pávanum, sum segði, at latín var kirkjumálið.

Luther fór síðani sjálvur at yrkja sálmar. Tann fyrsti sálmurin, Luther skrivaði á týskum, var *Vár Guð er føst og haldgóð borg*, og er hetta ein umyrking av 46. Sálmi í Gamla Testamenti.

Sálmurin gjørdist eitt slag av mótmælissálmi hjá partamonnum Luthers, sum vóru kallaðir lutheranarar ella protestantar. Tað hendi fleiri ferðir, at kirkjufólkið skar í at syngja undir prædikuni og køvdi teir katólsku prestarnar, sum vóru ósamdir við Luther.

Vandi var fyri uppreistri. Luther mótmælti læruni og tí mátanum kristindómurin varð útinntur í tí katólsku kirkjuni, og sum hann segði, hvørki tænti fólkinum ella Várharra. Hetta var vandafult, tí Luther kundi verða lýstur í bann av pávanum. At verða lýstur í bann er at verða útihýstur úr kirkjuni, og eftir katólskari hugsan eisini útihýstur úr himmalinum. Luther varð bannlýstur í 1520, og í 1521 var hann eisini gjørdur útlagin. Tað var vælvild frá Fríðrikki hinum Vísa, at Luther kom undan við lívinum, tí fúrstin flutti Luther burtur og goymdi hann á sínari borg. Meðan Luther var á slottinum hjá vinmanninum, týddi hann NT til týskt

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Uppgávur

1. Syngið sálmin og leggið til merkis, hví hann er eitt mótmæli?

Til songmeistarans; av Kora sonum, til alamot; ein sálmur. Guð er okkum vernd og verja, ein hjálp í trongdum, ið aldri svíkur. Tí óttast vit ei, um so jørðin verður umskift, um so fjøllini ryðja í havdýpið oman, um so havaldan sjóðar og brýtur, og bergið í ódnini skelvur. Harrin er við okkum, herskaranna Guð, Jákups Guð er vár fasta borg. Sela. Ein á og hennar løkir gleða Guðs stað, hin heilaga stað, har hin hægsti hevur búgv. Guð er í miðjum staði, so hann ikki skal vikast, tá ið lýsir av morgni, veitir Guð honum hjálp. Fólkini leikaðu í, ríkini góvu seg, rødd hansara ljóðaði, jørðin gekk kyk. Harrin er við okkum, herskaranna Guð, Jákups Guð er vár fasta borg. Sela. Komið og síggið stórverk Harrans, tær undurgerðir, hann innir á jørð! Hann fær kríggið at halda í, so langt jørðin gongur, bogan hann brýtur, hann ørvarnar støkkir av, skildirnar kolar hann upp! "Latið av og sannið, at eg eri Guð, hátt hevjaður fólkanna millum, hátt hevjaður á jørð!" Harrin er við okkum, herskaranna Guð, Jákups Guð er vár fasta borg. Sela.

46. Sálmur

2. Les 46. sálm og finn tey støðini, tú metir hava givið Luther íblástur, og samanber tey við *Vár Guð er føst og haldgóð borg*?

3. Siðaskiftið
    a) Nær kom siðaskiftið í Føroyum?
    b) Hví kom siðaskiftið?
    c) Hvussu fór siðaskiftið fram?
    d) Hvat gjørdist kirkjumálið í Føroyum við siðaskiftinum, og hví bleiv tað á hendan hátt?
    e) Nær fekk kirkjumálið ta støðu, tað hevur í dag?
    f) Nær fingu vit NT, bíbliur og sálmabøkur á føroyskum máli?

318 Um tú vilt gleði vinna

1. Um tú vilt gleði vinna,
søk ei til hægsta sal!
Nei, eydnan er at finna,
har grannar semjast væl,
har kærleiki man ráða,
har blídni er við borð,
har mildar tungur sáa
tey mjúku troystarorð.

2. Tey, sum Guðs vilja gera,
og elska fólk og land,
tey signing við sær bera,
sum sløkkir hatskan brand.
Tey lýsa gjøgnum strevið,
tey bjarga lond úr neyð,
tey sigra víst. Guð gevi,
vit teljast millum tey.

Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 347.

Um sálmin

Skaldið, Mikkjal Dánjalsson á Ryggi, (1879-1956) yrkir her um gleðina. Vit vilja øll fegin hava lut í gleðini og vilja gera nógv fyri at gerast glað. Skaldið førir fram, at tað er sera einfalt at finna gleðina. Hon er ikki einans at finna, har alt er stórbært og fínt, nei, gleðin er at finna í tí dagliga millum okkara vinir, grannar og næstrafólk.

Skaldið mælir til, at vit fylgja Jesu orðum, um hvussu vit skulu fara við okkara næsta, bera yvir og í staðin fyri at ilskast fyrigeva og koma við tí góða orðinum tí: Kærleikin fjalir fjøld av syndum (1. Pæt. 4,8). Kærleikin fyrigevur og vil ongum ilt, tí vilja tey, sum lýða Jesu kærleiksboð og sýna tolsemi, eisini vera við til at fáa frið í lag. Sálmurin endar við eini bøn, um at vit mugu teljast millum tey, sum søkja hesa gleði, og tessvegna eru til signingar.

Í Bíbliuni lesa vit ofta um, hvussu vit skulu vera móti okkara næsta. Tvey skriftorð, sum ofta verða drigin fram, eru hitt dupulta kærleiksboðið og hin gylta reglan. Í tí dupulta kærleiksboðum vísir Jesus millum annað á, at næsti okkara er tann, sum ger kærleiksgerning móti okkum. Hann ger upp við gamla vanahugsan, um hvør eigur at taka sær av tí, ið treingir, og hvør er okkara bróðir. Her áminnir Jesu okkum á, at vit

skulu hjálpa okkara næsta og ikki sita og bíða, til tey fyrst hava hjálpt okkum. Tað eru vit sjálv, sum skulu fara til verka fyrst.

Hitt dupulta kærleiksboðið

"Og tú skalt elska Harran, Guð tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum huga tínum og av øllum mátti tínum." Annað er hetta: "Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg." Einki annað boð er størri enn hesi." Mark. 12,29-31

Hin gylta reglan

Alt tað, sum tit tí vilja, at menn skulu gera móti tykkum, tað skulu tit eisini gera móti teimum; tí at hetta er lógin og profetarnir. Matt. 7,12

Uppgávur:

1. Hvat sigur hitt dupulta kærleiksboðið um kærleika og at elska?
2. Hin gylta reglan er positivt orðað, tað vil siga, at tú ert tann, sum ert virkin (aktiv/ur), men ofta, tá vit hoyra hana umtalaða, verður hon umtalað óvirkin (passiv), tað vil siga, at tú ikki ert virkin.

   a) Umskriva tí hina gyltu regluna so at hon gerst óvirkin (passiv): Alt tað, sum eg **ikki** vil, at menn skulu gera……

   b) Hvør er munurin millum ta virknu regluna í Bíbliuni og ta óvirknu regluna, tú skrivaði?

   c) Heldur tú, at tað ger tað sama, hvørja av hesum reglunum tú nýtir. Grundgev títt svar?

Aðrar uppgávur

Slatur

Mítt land hevur fostrað eitt ravnaslag,
fegnast tað flýgur um nætur;
brátt vaknaði mangur til beiskan dag,
ið ikki gav eftir tí gætur.

Mítt land hevur forstrað eitt ravnaslag.,
fegnast tað flýgur um nætur;
sum havhestur sprænir lýsi, tað
spýr eiturkynt, svíðandi hatur.

Tað herjar á sakleysar, sovandi menn, -
steingið øll hurðar, um nætur! –
tí rovdjórið eigur flensandi tenn,
tá ið merkist í nándini matur.

Eg kenni ljótt gorrandi ravnaslag,
ið fegnast flýgur um nætur
og heldur átfund á rotnandi ræ:
tað er ormgitið níðingaslatur.

J.H.O. Djurhuus

1. Í 1904 yrkti Jens Hendrik Oliver Djurhuus (1881-1948) yrkingina *Slatur*. Les yrkingina og greina hana.
2. Hvørja støðu hevur J.H.O. Djurhuus til sínar grannar ella samfelagið, hann livdi í?
3. Samanber huglagið í sálminum og huglagið í yrkingini.
4. Hvat av skaldunum, metir tú, hevur rætt, ella hevur annað rætt? Grundgev fyri tínum svari.
5. Kanna, hví J.H.O. Djurhuus er so beiskur í hesi yrkingini.
6. Heldur tú, at yrkingin hjá J.H.O. Djurhuus hevur nakað at siga okkum í dag?

327 Hin signaða dag vit síggja fró

Hin signaða dag vit síggja fró
úr havinum upp at stíga,
hann hækkast á himli, og hvør tjóð
seg gleðir við ljósið blíða;
tað kennist á okkum, ljósins børn,
at náttin man burtur glíða.

2. Hin sælasta stund, hin miðja nátt,
tá Krist seg í heim læt bera,
tá klárnaði upp í eystri hátt,
so gylt mundi glæman vera;
tá ljósið upp rann, sum jarðarknøtt
skal glitrandi bjartan gera.

3. Um livandi varð hvør urt í verð
og kundi við tungum røða,
tær orkaðu ei Guðs náðar gerð
nóg virðisligt út at kvøða,
tí ævigt nú skínur lívsins ljós,
sum sjúkastu sál kann grøða.

4. So takka vit Guði hjartans glað
sum fuglur á ljósum degi,
tí hann okkum gav tann gylta dag
og vakti upp lív við megi,
hin signaða dag í Jesu navn,
sum gevur Guðs børnum gleði.

5. Nú signaður dagur góður líð
við geislandi sólarspæli,
hvør løta til Harrans heiður glíð
sum blíðmælta á í dali,
og songur til tøkk við frøi stíg
upp móti Guðs ljósa sali.

6. Sum gull er hin væna morguntíð,
tá dagur av deyða rísur;
enn fjálgari bros á kvøldi blíð
hin rodnandi glæman vísir,
hvør følnaða kinn tá dæmi fær,
og gleði úr eygum lýsir.

7. So fara vit til várt fedraheim,
har dagur ei legst í dvala,
at búgva í borg við sælum gleim',
í glitrandi høllum spæla,
í frøi og frið um alla tíð
við vinir í ljósi tala.

Donsk miðaldarvísa.
Grundtvig 1826.
Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 145.

Um sálmin

Í 1826 skuldi danska kirkjan hátíðarhalda, at 1000 ár vóru liðin síðan kristniboðanina í Danmark. Í hesum sambandi skrivaði Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) nakrar sálmar til hátíðargudstænastuna í Vor Frelsers Kirke í Keypmannahavn hvítusunnudag. Ein av sálmunum var *Hin signaða dag*, sum var ein umyrking av einari dagvísu úr miðøld.

Men bispur og aðrir, hildu eygað við Grundtvig, tí teimum dámdi ikki tað, hann skrivaði, og teimum dámdi heldur ikki teir nýggju sálmarnar, Grundtvig skrivaði til 1000 ára haldið. Teir hildu ikki, at sálmarnir hóskaðu til gudstænastur, tí at innihaldið ikki var nóg gott, og Grundtvig fekk forboð fyri at skriva. Grundtvig gjørdist í øðini og segði seg frá sum prestur beint undan tí ætlaðu gudstænastuni.

Sjálvt um sálmurin ikki var sungin til gudstænastuna, so bleiv hann kortini ein av teimum nógv sungnu sálmunum gjøgnum tíðirnar. Grundtvig sipar til ”dagin”, sum mynd upp á mannalívið úr vøggu í grøv. Hann samanber mannalívið við ein dag, sum gongur móti kvøldi – deyðanum, men Grundtvig steðgar ikki her, hann vísir samstundis á ta kristnu vónina, tá lívsdagurin endar: *So Fara vit til várt fedraheim, har dagur ei legst í dvala…*

Hetta er ikki einans ein sálmur um dagin frá sólarisi til sólsetur, men eisini ein hátíðarsálmur: *Hin sælasta stund hin miðja nátt, tá Krist seg í heim læt bera,* vísir til jólini. *Tí hann okkum gav hin gylta dag, og vakti upp liv við megi,* vísir til páskirnar. Og í upprunatekstinum sipar hann í 5 ørindi til hvítusunnuna og til 1000 ára haldið við orðunum: *Nú signaður dagur góður líð.*

Ljósið

Grundtvig kallar menniskjuni *ljósins børn* í sálminum, og meinar hann við hesum, at vit eru Guðs børn. Við sólini gevur Guð okkum eina gávu. Sólin breiðir ljós, hita og tryggleika. Alt tað, sum í náttarmyrkrinum ræddi okkum, sýnist øðrvísi í dagsljósi. Tá ið Grundtvig kallar menniskjuni ljósins børn, merkir tað eisini, at vit eiga at breiða ljós og hita rundan um okkum. Vit skulu við okkara næstakærleika gleða okkara meðmenniskju, so at tey kenna seg væl saman við okkum, og á tann hátt tendra ljós í lívinum hjá hvørjum øðrum.

Uppgávur:

1. Grundtvig metir mannalívið sum ein dag, hvørjar tankar fært tú um lívið, tá tú lesur sálmin?

Aðrar uppgávur:

1. Les sálmin og tekstin hjá Prædikaranum

Alt hevur Guð gjørt lagaliga til sína tíð

Fyri øllum er ein avmarkað stund, og ein og hvør lutur undir himlinum hevur sína tíð: At føðast hevur sína tíð, og at doyggja hevur sína tíð; at seta niður hevur sína tíð, og at taka upp tað, sum niður er sett, hevur sína tíð. At drepa hevur sína tíð, og at lekja hevur sína tíð; at ríva niður hevur sína tíð, og at byggja upp hevur sína tíð. At gráta hevur sína tíð, og at læa hevur sína tíð; at syrgja hevur sína tíð, og at dansa hevur sína tíð. At kasta steinar hevur sína tíð, og at henta steinar hevur sína tíð; at fevnast hevur sína tíð, og at halda sær frá favntaki hevur sína tíð. At leita hevur sína tíð, og at missa hevur sína tíð; at goyma hevur sína tíð, og at forkoma hevur sína tíð. At skræða sundur hevur sína tíð, og at seyma aftur hevur sína tíð; at tiga hevur sína tíð, og at tala hevur sína tíð. At elska hevur sína tíð, og at hata hevur sína tíð; ófriður hevur sína tíð, og friður hevur sína tíð. Hvønn vinning fær so tann, sum arbeiðir, av teirri møði, sum hann hevur? Eg havi sæð ta plágu, sum Guð hevur givið mannabørnunum at plágast við. Alt hevur hann gjørt lagaligt til sína tíð, eisini ævina hevur hann lagt í hjørtu teirra, men tó so at menniskjan ikki er før fyri at skilja tað verk, sum Guð ger, frá upphavi og til enda. Tá fataði eg, at hjá teimum er einki betri enn at gleðast og gera sær til góða, meðan lívið er. Men tað at eta og drekka og njóta fagnað mitt í allari møðini, tað er eisini hvørjum manni ein gáva frá Guði. Eg fataði, at alt, sum Guð ger, tað stendur við allar ævir, har legst einki afturat, og har tekst einki burturav; og soleiðis hevur Guð gjørt tað, fyri at menn skulu óttast hann. Tað, sum hendir, hevur longu verið, og tað, sum fer at henda, hevur longu verið áður; Guð leitar upp aftur tað, sum farið er. (Præd.3,1-15)

2. Hvørjar tankar fært tú, tá ið tú lesur tað, Prædikarin skrivar?

3. Hvat heldur tú, at tú kanst læra av hesum báðum tekstunum?

398 Miskunnsami mildi faðir

1. Miskunnsami mildi faðir,
gev í dag oss dagligt breyð!
Tú, sum grøs og liljur klæðir,
føðir fugl um hav og heyg,
fram um alt á foldum her
menniskjan tær kærast er,
trygt vit kunnu á tað líta,
ei tú vilt oss føði sýta.

2. Veit tí tú mær dagsins føði,
ei eg kann av sjálvum mær;
havsins fong og landsins grøði,
alt eg fáa má frá tær,
røkja seyðin vit sum best,
óvist er, hvat fæst í heyst,
Harrin og ei hagamaður
er tað, fyri skurði ræður.

3. Hvat kann eg av sjónum taka,
sendir Guð ei fisk í hav;
óhent nýtti eg mín haka,
um Guð ikki vøkstur gav;
fáfongt róðu vit um kapp,
vildi Guð, at grindin slapp;
føðir Guð ei fuglameingin,
ónýtt verður fleygastongin.

4. Vakur er ein veltur dalur,
grasgóð er ein albeitt líð;
tó, hvat geva kýr og smalur,
leggur Guð ei signing í!
Uttan hegni, vit og kraft
armóð høvdu øll vit havt;
gloym ei, tað er Guð, ið gevur
arbeiðsevni, tey tú hevur.

5. Síggi eg ein stakkal stríða
til at metta svangan munn,
Jesus, eg títt orð vil lýða,
ikki elska mammons grunn,
gera, sum mín Guð tað vil,
geva, har tað treingir til;
neyðarstaddan ei at gloyma
betri er enn gull at goyma.

6. Prísið Guði øll við gleði
fyri hjálp og dagligt breyð!
Ongantíð frá yngsta degi
læt hann okkum líða neyð,
hvønn ein morgun, faðir mín,
leita vil eg mær til tín,
og tá sól í hav er lækkað,
fyri dagligt breyð tær takka.

Mikkjal á Ryggi.
Lag: sum Sl. 163.

Um sálmin

Skaldið, Mikkjal Dánjalson á Ryggi, (1879-1956) yrkti sálmin yvir 4. bøn í faðirvár, men sálmurin hevur ikki einans faðirvár í Matt. 6 sum fyrimynd, men hann nýtti eisini viðmerkingarnar (frágreiðingarnar) til bønina í Luthers lítlu Katekismus.

Mikkjal á Ryggi yrkti sálmar yvir allar bønirnar í faðirvár. Sálmarnir prýddu forsíðuna á Kristiligum Ungmannablaðið í árunum 1942-1945. *Miskunnsami mildi faðir* kom á forsíðuna í blaði nr. 4 í 1944.

Allir sálmarnir Mikkjal á Ryggi yrkti til faðirvár, eru at finna í Sálmabókini, og standa teir hvør eftir annan frá nr. 394-404. Sálmarnir eru nakað langir, tí eru onkrir teirra býttir í partar, og hetta ger tað eitt sindur torført at síggja, hvør sangur hoyrir til hvørja bøn. *Miskunnsami mildi faðir* stendur tó, sum M. á Ryggi yrkti sálmin.

Dagligt breyð

Í sálminum síggja vit, hvussu Mikkjal á Ryggi tengir saman bønina um dagligt breyð og tann dagligdagin hann sjálvur livir í. Væl skal menniskjan stríðast við at fáa dagligt breyð til høldar, men uttan Guds signing verður alt hetta stríð til einkis. Gevur Guð ikki gróður og ávøkst, so er alt arbeiðið til fánýtis. Men vit eiga ikki einans at hugsað um okkum sjálv, tí betur er at geva har treingir, enn gull at goyma.

Dagligt breyð hevur altíð verið og fer altíð at vera ein týdningarmikil spurningur fyri menniskja. Tað er sera ymiskt hvat fólk hugsa um, tá ið tey siga dagligt breyð. Eisini kann vera stóru munur á, hvat fólk úr ymiskum heimspørtum meina við hugtakið dagligt breyð.

Hyggja vit at samtíðini hjá Mikkjali á Ryggi og samanbera tað við okkara samtíð, er munurin stórur. Tað er ein sannroynd, at meira nútímans og ríkari eitt samfelag gerst, minni tíð verður nýtt til at fáa matin til høldar. Vit kunnu keypa matin, í staðin fyri sjálv at gera hann, og vit kunnu goyma mat heilt øðrvísi enn fyrr. Hesir møguleikar gera okkum eisini meira fremmand yvir fyri matinum og náttúruni, sum gav matin, og hin stóri spurningurin er so, hvussu vit nýta tað tilfeingið, sum er í náttúruni, og hvussu bera vit okkum at, so at vit ikki skaða náttúruna og eyðræna hana.

Viðmerkingarnar til 4. bøn

Viðm. 1. Inn í hesa bøn leggja vit alt, sum okkum er tørvur á her á jørð. Vit biðja ikki um ríkidømi og yvirflóð, men bert um tað, sum okkum er fyri neyðini, og aftur við tí eitt takksamt hjarta.

Viðm. 2. Vit biðja himmalska faðir okkara, at hann í dag vil geva okkum dagligt breyð; tí í morgin vilja vit aftur biðja hann um tað, og vit vilja ikki plága okkum við stúran og ótta fyri morgindegnum.

Viðm. 3. Vit eiga at arbeiða fyri at fáa dagligt breyð, men tó er tað Guð, sum gevur

okkum tað; tí uttan signing hansara er alt arbeiði okkara til onga nyttu.

Viðm. 4. Tá ið Guð gevur okkum meira, enn okkum er neyðugt til dagligt breyð, mega vit ikki oyðsla tað burtur, men vit eiga at nýta tað soleiðis, at tað verður okkum og øðrum at gagni, og vit eiga at varða okkum fyri at misbrúka tað við at oveta okkum og drekka okkum druknar, tí slíkt er oyðandi bæði fyri sál og likam
Luthers Katekismus, J. Joensen týddi 1961 s. 61-62

Uppgávur:

1. Hyggið at viðmerkingunum til 4. Bøn.
   a) Hvat verður meint við, tá ið vit biðja um dagligt breyð?
   b) Biðja vit um ríkidømi og yvirflóð?
   c) Hvussu við degnum í morgin? Eiga vit at hugsa um hann?
   d) Hvussu eiga vit at umsita Guðs gávur, um vit t.d. gerast rík?
   e) Hvussu eiga vit ikki at gera við Guðs gávur?
2. Hvussu lýsir skaldið dagligt breyð í tíðini, sálmurin er skrivaður?
3. Hvussu lýsir tú dagligt breyð í dag?
4. Hví heldur tú at lýsingarnar hjá skaldinum og tær eru ymiskar?

Aðrar uppgávur

1. Hvussu er støðan við dagligum breyði í heiminum í dag. Royn og kanna hvønn heimspartin sær?
2. Hví heldur tú, at støðan er soleiðis í heiminum í dag?
3. Hvussu royna menniskju at bøta um støðuna?
4. Kennir tú nakrar altjóða felagsskapir, sum arbeiða á hesum økinum?
5. Hevur tú nakað hugskot um, hvussu og hvat eigur at vera gjørt á hesum økinum, so at øll fáa nóg mikið?

503 Frelsarin hirði mín góður er

1. Frelsarin hirði mín góður er,
hjá honum eg einki sakni,
við hann fylgir í míni ferð,
tryggur eg sovi og vakni.

2. Hátt hann sveiggjaði veðrastav,
tá bitvargar eftir mær løgdu,
skúgvi og ravni hann bana gav,
ólívishøgg hann mær grøddi.

3. Vónsvikin, troyttur, eg til hann kom
eg hvíld í hans fangi kenni,
vestanskuggin av fjallatrom
svalir mær sólbrenda ennið.

4. Lat tey meg leggja í gravarbú
og flag yvir leiðið tekja,
við mær, hirði mín, fylgir tú,
aftur til lívs meg at vekja.

5. Gangi so inn gjøgnum portur gylt,
ei fjøtra meg deyðans leinkjur,
steyp av sælu á tremur fylt,
hirði mín, frelsarin, skeinkir.

23. Sálmur og Jóhs 10,11...
Ingemann 1840. Sigmund Danielsen.
Lag: Sl. 73.

Frelseren er mig en hyrde god

1. Frelseren er mig en hyrde god,
hos han skal jeg intet savne;
lammet hviler ved hyrdens fod,
nævnes med kærlige navne.

2. Såret jeg flyed fra ulvens tand,
mit blod til hans fod er rundet;
selv han bar mig til kildens rand,
der har jeg lægedom fundet.

3. Hovedet hviler jeg i han skød,
jeg læskes af livets vande,
palmen køler mig dagens glød,
svaler min brændende pande.

4. Skal jeg end vandre til ormes land,
og gå gennem dødens skygger,
hos mig vandrer i skyggen han,
lyser hvor rædselen bygger.

5. Ud fra forrådnelsens hjem jeg går,
forbarmelsens hånd mig kvæger;
hos mig kærligheds fyrste står,
rækker mig saligheds bæger

23. Sálmur og Jóh. 10,11 ...
B.S. Ingemann 1840

Hin góði hirðin

Ein sálmur av Dávidi. Harrin er hirði mín, ongan sakn eg kenni.
Á grasgóðum fløtum hann letur meg liggja, til hvíldaráir hann leiðir meg.
Hann sál mína lívgar, fyri navn sítt meg beinir á rætta leið.
Gangi eg í dimmum dølum, einki ilt eg óttist. Tí tú ert við mær, tín stavur og tín keppur, teir ugga meg.
Mær borð tú reiðir fyri eygunum á fíggindum mínum. Við smyrsli tú salvar mítt høvur, bikar mítt yvir flýtur.
Eina góðska og náði mær fylgja allar mínar lívsins dagar. Í Harrans húsi eg dvøljist í endaleysar tíðir.
23. Sálmur

Hin góði hirðin

Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setir lív sítt til fyri seyðirnar. Leigusveinurin, sum ikki er hirði og sum ikki eigur seyðirnar, sær úlvin koma og fer frá seyðunum og rýmir, og úlvurin rænir teir og spjaðir teir sundur, av tí at hann er leigusveinur og hann einki leggur í seyðirnar. Eg eri hin góði hirðin, og eg kenni mínar, og mínir kenna meg, eins og eg kenni faðirin, og faðirin kennir meg; og eg seti lív mítt til fyri seyðirnar.
Jóh. 10, 11-15

Um sálmin

Danska skaldið Bernhard Severin Ingemann yrkti sálmin í 1840. Ingemann yrkir yvir 23. Sálma GT og Jóh. 10,11 ff í NT. Ingemann samantvinnar hirðatankan úr GT við Jesus sum hin góða hirðan í NT. Í Jóh. 10 hoyra vit eisini um úlvin, sum vil ræna og drepa, og tí er tað týdningarmikið at halda seg til hin rætta hirðan og ikki leigusveinin. Men hirðin fylgir við allan vegin, ja sjálvt gjøgnum jarðarferð og deyða og at enda, tá ið deyðin er yvirvunnin *Steyp av sælu á tremur fylt, hirði mín, frelsarin, skeinkir.*

Frelsarin hirði mín góður er, er dømi um ein sálm, sum bæði er týddur og umyrktur. Sigmund Danielsen (1905-1988) hevur ikki einans týtt sálmin, men flytur sálmin í føroyskt umhvørvi, so vit kenna okkum aftur í umhvørvinum. Vit møta skúgvi og ravni, og bitvargar gera um seg, og hirðin sveiggjar sín veðrastav. Vestanskuggin um fjallagreinina kennist eisini heimligur. Hóast umhvørvið er heimligt, so kenna øll frásøgnina aftur um hin góða hirðan, ikki minst av byrjanarorðunum.

Uppgávur:

1. Greina tann føroyska sálmin eftir frymlinum.
2. Les tann danska sálmin og samanber tann føroyska og danska sálmin. Hvar líkjast teir, og hvar líkjast teir ikki ?
3. Les bíbliutekstirnar.
4. Hvør sálmurin (hin føroyski ella danski) liggur nærri bíbliutekstinum í 23. Sálmi?
5. Hvussu er huglagið (stemningurin) í føroyska sálminum?
6. Hvussu er huglagið í danska sálminum?

516 Ljósið rann av kærleiks runni

1. Ljósið rann av kærleiks runni,
lívið spratt av kærleiks rót,
tí er fjálgt Guðs veldi funnið
og hans andi sálarbót.
Eins og Jesus okkum segði,
andi hans í minni legði,
liva vit og troystast við
lívsins vón og kærleiks frið.

Kærleikin ger ikki næstanum nakað ilt; tí er kærleikin uppfylling av lógini. Róm. 13,10

2. Kærleikin er lívsins krúna,
kærleikin er ljósins mið,
tí er nú í lívsins búna
Jesus krýndur við Guðs lið.
Lambið ljós og lív er vorðið;
tað, sum syndir hevur borið,
situr nú við føður hond,
sendir okkum kærleiks ond.

Men fram um alt hetta íklæðist kærleikan, sum er band fullkomileikans! Kol. 3,14

3. Kærleikin er fylling lógar*
og fullkomuleikans band,**
alt hann ger, sum Guði hóvar,
skapar lív og ljós um land.
Har sum kærleiks andi ræður,
finnur frið í hjarta maður,
verður eitt við syni hans,
sum er Guð og faðir mans.

** Róm 13,10. ** Kol 3,14*

Grundtvig 1833. G. Bruun.
Lag: Sl. 212.

Gudmund Bruun (1891-1956) týddi sálmin eftir Grundtvig. Grundtvig yrkir her um kærleikan, sum kemur frá Guði, og ger tað, sum Guði toknast, um hann væl at merkja sleppur framat í mannalívinum.

Eins og kærleikin er upprunin til lívið, er hann eisini lívsins krúna. Jesus sjálvur er lívsins ljós, og í kærleika gav hann seg fyri okkum.

Kærleikin lýkur øll lógarkrøv og samanfatar allar dygdir, og einans í kærleikanum kunnu vit gera tað, Guð vil hava okkum at gera, tí har kærleiksandi ræður, finnur menniskjan frið og verður eitt við Faðirin og Sonin.

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Uppgáva

1. Greinið sálmin eftir frymlinum.
2. Hvat meina vit við, tá vit siga næstakærleiki?
3. Hvat man skaldið meina við, tá hann sigur *Kærleikin er lívsins krúna*?

Aðrar uppgávur

1. Orðið kærleiki verður nógv nýtt ella misnýtt í tí dagliga. Vit kunnu eisini siga, at tað finnast fleiri sløg av kærleika.

   a) Skriva niður tey sløgini av kærleika, tær kemur til hugs, tá tú hoyrir orðið?

   b) Tekna eitt hjarta á eitt pappír og set kærleiksorðini, sum tú skrivaði, á hjartað, so tey týdningarmestu koma at standa í miðjuni á hjartanum. Hvørji orð koma tá at standa inni í hjartanum, og hvørji koma at standa í útryðjuni ella uttanfyri?
2. Samlið øll orðini, sum flokkurin hevur funnið um kærleika.

   Samanberið. Eru orðini tey somu?
3. Gerið eitt felags hjarta fyri flokkin, sum øll kærleiksorðini verða sett á.

   Vitið um flokkurin kann semjast um, hvar á hjartanum tey ymisku orðini eiga at standa.
4. Samtalið í flokkinum um, hvussu tit fata kærleika.

546 Sí, úr havi rísur nú morgunsól

1. Sí, úr havi rísur nú morgunsól,
roðandi hon logar á heyg og hól.
Sólarglæman ljómar um høv og lond,
nú tá ljósið lendir á heimsins strond.

2. Eg vil lætt og frítt draga andadrátt,
syngja Guði lov, nú er horvin nátt;
bera honum tøkk hvørja morgunstund,
hóast synd og deyða er ljós mín lund.

3. Bera honum tøkk, tí tá sólin rann,
eg í sál og likami kenna kann
sæla troyst, og ugga fær sálin mín,
bert eg sigi trygt: Verði vilji tín.

4. Tori eg at fevna teg, stundin sæl,
nevna teg við nøvnum, mær líkar væl,
nøvn, sum mínum kærleika siga frá:
móðir, systir, unnusta, hjartans trá.

5. Ljóshav eftir ljóshav at himni ber,
hagar lotið kemur, nú morgun er,
sum var ljósið andin, mær fell í lut.
Á, tú mildi skapari, faðir, Guð.

6. Lat meg bara fara um náttmyrk høv,
lat meg bara stevna at míni grøv,
lívsins Guð meg verjir á mínum veg,
og úr deyðans hondum hann frelsir meg.

7. Sí, tá rísur sólin úr havi brátt,
maktast myrkurs megi og deyðans nátt,
sigursljómur ljóðar um høv og lond,
stilt nú ljósið stendur á lívsins strond.

Jacob Knudsen 1891. Axel Tórgarð 1945.
Lag: Sl. 288

Um sálmin

Sálmurin er skrivaður av Jacob Knudsen (1858-1917), sum var prestur í eini valmeinigheit í Mellerup nær við Randers. Hildið verður, at skaldið fekk íblásturin til sálmin úr náttúruni, har hann búði. Jacob Knudsen búði við Randers fjørð við útsýni yvir grønar eingir báðu megin fjørðin, og móti eystri sá hann fjarðarmunnan og Kattegat, og har fjørðurin og havið møtast, sá hann sólina rísa.

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Skaldið syngur um ein vakran morgun. Hann takkar Guði fyri, at tann myrka náttin er horvin, og hóast alt tað dapra verður alt lagt í Guðs hond við orðunum *Verði vilji tín*! Guð verður lovaður, og dagurin verður heilsaður við øllum teimum kærastu nøvnunum, yrkjarin kann hugsa sær, móðir, systir, unnusta og hjartans trá. Hvat enn hendir her í lívinum, so er Guð við - hjálpir og frelsir, ja sjálvt úr deyðans hondum, og einaferð skulu eisini deyðans skuggar víkja fyri seinastu ferð *Stilt nú ljósið stendur á lívsins strond.*

At týða sálmar

Sí, úr havi rísur hevur, eins og nógvir aðrir av okkara sálmum, sín uppruna í fremmandum máli. Tað er ikki altíð, vit hugsa so nógv um, at ein tekstur ella yrking er týdd, og aloftast kenna vit ikki tekstin á upprunamálinum. Tað kemur eisini fyri, at sálmurin er fleiri ferðir týddur og umarbeiddur gjøgnum tíðirnar. Tað er ikki óvanligt, at sálmar verða broyttir. Tá ið nýggjar sálmabøkur koma út, kunnu onkur gomul orð verða broytt til orð, vit kenna og nýta í dag. Sálmar verða styttir ella longdir, og við hvørt verða sálmar eisini settir saman.

Tá ið ein sálmur verður týddur, er nógv at hugsa um, tí teksturin er vorðin til í einum øðrum umhvørvi, í eini aðrari tíð og eini aðrari mentan o.s.fr. Við hvørt hevur hetta ikki stóran týdning fyri innihaldið, men í øðrum førum hevur tað stóran týdning bæði fyri fatanina av innihaldinum og fyri hvønn íblástur, sálmurin gevur okkum, tá vit lesa hann. Týðarin má eisini leggja seg eftir boðskapinum í sálminum, og tað er týdningarmikið, at boðskapurin ikki skeiklast og fer av lagið, og hetta kann vera torført, serliga tá talan er um kenslur, og sálmar tala nógv til kenslurnar.

Týðarin kann velja at leggja sína týðing tætt upp at upprunatekstinum, so at hann næstan verður týddur orð fyri orð og setning fyri setning, men nakrar broytingar verða altíð, tá talan er um tvey ymisk mál.

Týðarin kann eisini velja at umyrkja sálmin. Tað er ein meira frí og leyslig týðing, har til ber at laga tekstin eftir teimum broyttu umstøðunum t.d. at taka føroyskar náttúrulýsingar og hugtøk í staðin fyri tað fremmanda. Við eini umyrking leggur yrkjarin eisini nakað av sínum egna boðskapi í sálmin, sum ikki fanst í uppruna

sálminum. Men markið er rættiliga flótandi, tað er ikki altíð lætt at siga, nær talan er um eina umyrking ella týðing.

Tað finnast tvær føroyskar týðingar av trimum teimum fyrstu ørindunum av *Se, nu stiger solen af havets skød*. Týðingin *Sí, úr havi rísur nú morgunsól* stendur í nýggju Sálmabókini, meðan hin týðingin *Sjá nú stígur sólin* stóð í gomlu Sálmabókini

Nýggja sálmabókin

Sí, úr havi rísur nú morgunsól

1.Sí, úr havi rísur nú morgunsól,
roðandi hon logar á heyg og hól.
Sólarglæman ljómar um høv og lond,
nú tá ljósið lendir á heimsins strond.

2. Eg vil lætt og frítt draga andadrátt,
syngja Guði lov, nú er horvin nátt;
bera honum tøkk hvørja morgunstund,
hóast synd og deyða er ljós mín lund.

3. Bera honum tøkk, tí tá sólin rann,
eg í sál og likami kenna kann
sæla troyst, og ugga fær sálin mín,
bert eg sigi trygt: Verði vilji tín.

Axel Tórgarð

Gamla sálmabókin

Sjá nú stígur sólin

1.Sjá nú stíður sólin av havsins brú,
loft og bylgjur glógva sum brandar nú;
kennist sælur songur, tó alt er stilt,
nú ið ljósið glitrar sum strendur gylt.

2.Anda vil eg frítt nú í fróum lag,
syngja Guði lov fyri ljósan dag,
takka fyri morgun, sum sælur ber,
og so glaður ganga til dagsins gerð.

3.Takka góðum Guði, sum sól mær gav.
Sál og likam lætna, nú nátt er av,
myrkur burtur hvørvur, og sorgin fer,
tá eg tryggur sigi: Tín vilji ver!

Mikkjal á Ryggi

Se, nu stiger solen af havets skød

1.Se, nu stiger solen af havets skød,
luft og bølge blusser i brand, i glød,
hvilken salig jubel, skønt alt er tyst,
medens lyset lander på verdens kyst.

2.Jeg vil ånde luften i fulde drag,
synge Gud en sang for den lyse dag,
takke ham, at morgnen mig end er sød,
at mig dagen fryder, trods synd og død.

3.Takke ham, som gav mig, når sol står op,
selv at føle morgen i sjæl og krop,
at al mørkhed svinder og sjæleve,
blot jeg trygt vil sige: Din vilje ske!

Jacob Knudsen

Uppgávur:

1. Greina *Sí úr havi rísur* (allan sálmin) eftir frymlinum

2. Hygg at teimum trimum ørindunum omanfyri:
   a) Hvønn mun sært tú millum tær føroysku týðingarnar?
   b) Hvønn mun sært tú millum tær føroysku týðingarnar og tann danska upprunatekstin?
3. Ger ein mynd av tí ørindinum í sálminum, *Sí úr havi rísur*, sum tær dámar best (tú kann velja millum øll 7 ørindini í sálminum, sí blas. 50).

561 Nú sólin aftan fyri fjall

1. Nú sólin aftan fyri fjall
sítt ljósa andlit goymir,
og myrkrið yvir heimin fall,
og jarðarríkið droymir.
Send tína náði, Guð, til mín,
so friður tín
inn í mítt hjarta stroymir.

2. Kom, Jesus, inn og hjá mær ver,
nú tað at kvøldi stundar,
og lat tín eingil standa her,
tá trygt mítt eyga blundar;
og varðveit væl vár' hvíldarstað,
vek okkum glað
á morgni tær til fundar.

3. Gev frið í hjarta, sál og sinn,
nú lívið um meg tagnar,
og á ta síðstu stund meg minn,
tá ikki meir tað dagnar,
tá sólin næsta morgun sær
um fjallaskarð,
men mær hon einki gagnar.

4. So ferðist eg, mítt arma støv,
í ódn mót streymi stríða;
hvørt spor ber móti míni grøv,
eg her á foldum stígi.
Eg beri Ádams hold í mær,
o, Harri kær!
eg náði tínar bíði.

5. Eg gevi meg í Jesu hond,
eg ikki ráð skal sakna,
hann førir meg til lívsins lond,
hvar allir stormar tagna.
Um vit í moldum eru huld -
for Kristi skuld
vit lívsins morgun vakna.

Elias Blix 1875.
S.M. Zachariasen.
Lag: Sl. 252 ella sum Sl. 244.

Um sálmin

Elias Blix (1836-1902) var norskt skald. Hann yrkti uml. 130 sálmar. Tað eru serliga tvey høvuðsevni í hansara sálmayrking, deyðin og várið. Fyri Blix er deyðin inngangurin til tað nýggja várið. Deyðin er umskiftið til kláran dag, tá vit skulu liva í Kristi ljósi. Tessvegna gerst deyðin, so tungur hann enn kann vera, ikki einans myrkur og vónloysi, men inngongdin til nakað gott, og Jesus sjálvur er í fylgi við okkum og lýsir gjøgnum deyðans myrkur.

Nú sólin aftan fyri fjall er ein kvøldsálmur, har skaldið samanber eitt vanligt kvøld við lívskvøldið hjá menniskjanum.

Uppgávur:

1. Greina sálmin eftir frymlinum.
2. Hvat meinar skaldið við, tá ið hann sigur: *Eg beri Ádams hold í mær?*

3. Sálmurin er ikki einans merktur av tankum um kvøldið ella lívskvøldið. Vit síggja eisini aðrar tankar í sálminum t.d. uppreisnartankan. Hvar síggja vit hann?
4. Hvørjar tankar fært tú, tá ið tú lesur/syngur sálmin (skriva minst 10 stikkorð niður).

Aðrar uppgávur:
Ger eina kvøldaryrking (tú kanst nýta stikkorðini, tú skrivaði niður, um tú heldur vilt tað).

576 Nú leiti eg til tína náði

1. Nú leiti eg til tína náði
og gevi meg tær í hond,
tú hava skalt meg í ráði,
meg leiða skulu tíni bond.
Ta stund, eg á foldum eri,
meg lívga skal trygdin tín,
títt orð eg sum skjøldur beri,
til tín stendur hugur mín.

2. O, Jesus, dagstjørnan bjarta,
sum ljós og lív er mær.
Eg takki tær av hjarta
fyri ugga og aga frá tær.
Ger lutir mínar so reinar,
áðrenn eg skal dømast av tær,
sum gull og dýrastu steinar,
sum sólin so bjørt og skær!

3. O, Jesus, tú lívsins drottur,
tú hoyrdi nú, hvat eg bað!
Meg verja skal tín máttur,
tá altíð mær lundin gerst glað.
Tú send mær einglavernd tína,
tá eg hiðan sovna skal,
frels meg frá helvitis pínu,
før meg í himmiríkis sal!

Hans Thomissøn 1569. J. Dahl.
Lag: sum Sl. 55.

Útróðrarbátarnir tóku ferð
vígdir av heilagum sangi,
átrúni halgaði manna gerð,
menti væl skipsmanna mikla her,
uggaði einkjanna meingi.
5.ø av Fedranna kirkja í Føroya tjóð, nr.243

1. Lov og tøkk og allan heiður,
syni Guðs, vit siga tær;
menniskjan nú frelsu eigur,
sum í deyðavanda var,
góði Jesus, lær tú meg,
at eg gangi rættan veg
og í fótspor tíni stígi
og í treysti fram meg stríði.

2. Lat meg onga tíð teg svíkja,
um at sút og sorgir her
vilja byrðar á meg díkja,
men at eg, ið hvussu fer,
elski teg inntil mín deyð',
so mær linna alla neyð
føðing, deyði tín og pína, -
lat tey aldri frá mær dvína.

Kingo 1689. J. Dahl 1924.
Lag: Sl. 213. nr. 346 í Sálmabókini

Um sálmin

Nú leiti eg til tína náði stendur sum ein sjóferðarsálmur í Sálmabókini. Í veruleikanum er sálmurin partur av einum longri sálmi nevniliga 5.-7. ørindi av *Eg vil mínum Harra prísa* hjá Hans Thommissøn (1532-1573).

Nú leiti eg til tína náði varð nógv nýttur sum sjóferðarsálmur, tá róð var út við árabáti. Tað var ongatíð vandaleyst at fara avstað einans við árum og segli sum áliti. Veðrið kundi skifta skjótt, og nógvir vóru teir, sum ikki slitu upp land. Teir noyddust eisini ofta at setast upp. Hetta vistu menn, tí løgdu teir seg í Harrans hond við einum sálmi, tá lagt varð frá landi, men teir gloymdu

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

heldur ikki at siga takk, tá teir á kvøldi komu aftur, og við einum sálmi takkaðu teir fyri varðveitslu og fong. Ein sálmur, sum ofta varð nýttur, tá teir komu at landi, var *Lov og tøkk og allan heiður,* nr. 346 í Sálmabókini. Hesin siðurin at syngja, tá bátarnir komu og fóru, helt sær líka til bátarnir fingu motor.

Uppgávur:

1. *Nú leiti eg til tína náði* kann lesast sum ein bøn. Hvat verður biðið um?
2. Hví heldur tú, at Jesus verður sammettur við dagstjørnuna?
3. Hvat verður takkað fyri í sálminum?
4. Hygg at 5. ørindi í *Fedranna kirkja í Føroya tjóð*
   a) Hvat sigur ørindi okkum um guðstrúnna nevnda tíðarskeiðið?
   b) Hvat sigur ørindið um samfelagið og næstakærleikan?
   c) Sært tú nakran mun millum hasa tíðin og okkara tíð og samfelag?
5. Hvørjar tankar fært tú, tá tú syngur/ lesur *Lov og tøkk og allan heiður?*

Sálmaskald

Martin Luther 1483-1546

Martin Luther var føddur 10. november 1483 í tí lítla týska býnum Eisleben. Dagin eftir, 11. november, bleiv drongurin doyptur og fekk navnið Martin eftir katólska halgimenninum fyri tann dagin, Santa Martin úr Tours. Í hesum sambandi er vert at nevna, at í okkara álmanakka eitur dagurin 10. november Luther, eftir Martin Luther, meðan 11. november – Mortansmessa – enn eitur eftir tí katólska halgimenninum.

Foreldrini Hans og Margretha Luther, vóru sera gudrøkin fólk. Luther fekk eina stranga uppaling, so at hann skuldi gerast eitt gott og rætthugsandi fólk. Hetta samsvaraði við tátíðar hugsanarhátt um Guð, sum ein strangan og rættvísan dómara. Ein dómara, sum náðileyst dømdi tey glataðu til æviga pínu, meðan tey rættvísu sluppu inn til himinsins dýrd.

Longu sum 4-5 ára gamal, bleiv Luther settur til arbeiðis. Pápin helt, at spæl og at ganga fyri einki, var rótin til alt ilt. Hin lítli Luther varð settur at ansa seyði. Hetta var eitt álitisstarv, tí seyðurin hevði stóran týdning í húsarhaldinum. Hann gav bæði ull, mjólk og kjøt .

Sum 15 ára gamal fór Luther á latínskúla. Skúlin var í Magdenburg, tí mátti Luther flyta heimanífrá og læra at standa á egnum beinum. Undirvísingin í skúlanum var ikki ókeypis, tí mátti Luther, saman við hinum latínskúlanæminginum, hvønn sunnudag syngja í kirkjukórinum fyri at gjalda skúlan. Men fyri at fáa til lívsins uppihald mátti Luther ganga runt í býnum og syngja fyri fólki.

Eftir latínskúlan fór Luther 18 ára gamal at lesa løgfrøði í Erfurt. Hetta var ikki eftir egnum ynski, men tí at faðirin vildi tað. Nakað eftir hetta kom Luther út fyri tveimum hendingum, sum heilt broyttu lív hansara. Hin fyrra hendingin var, at Luther skar seg ógvuliga illa av eini koru (svørði). Ein stór blóðæðr varð rakt, og tað tyktist vónleyst at steðga bløðingini, og tað var eitt satt undur, at hann ikki doyði av hesum. Stutt eftir hesa hending, var Luther úti millum býir, tá ógvusligt óveður kom á hann. Brádliga sló toran niður við liðina á honum, og hann var bangin fyri ikki at vinna upp hús. Í

síni neyð og angist rópti Luther á hina heilagu (Onnu), sum var móðir Mariu moy, og lovaði, at um hann slapp við lívinum, skuldi hann gerast munkur.

Luther helt sítt lyfti, og tað er sum munkur og síðani prestur, at Luther fekk ómetaligan týdning fyri eftirtíðina. Luther gjørdist munkur í eini ógvuliga strangari kleysturskipan - Augustinarunum, og hann royndi av øllum alvi at liva fullkomið siðalagsliga. Hetta kundi einans náast við strongum fráhaldni og dagligum iðrannarverkið og sjálvsrevsing. Luther helt tó ikki, at hann fekk sálarfrið av hesum.

Í 1510-11 fór Luther eina pílagrímsferð til Róm, har hann fekk høvið at fáa innlit í mong viðurskifti í tí katólsku kirkjuni. Eftir hetta kom Luther í stríð við pávan og kirkjuna, sum hann metti misnýttu sítt vald yvir fólkinum. Stríðið harðnaði, og pávin lýsti Luther í bann, og tað merkti í veruleikanum, at Luther gjørdist friðleysur. Við hjálp frá góðum vinum slapp Luther til rýmingar, og vinmaður hansara, Fríðrikur hin Vísi, fjaldi Luther á borg síni. Meðan Luther fjaldi seg, týddi hann Nýggja Testamenti úr grikskum til týskt mál, so at vanlig fólk sjálv kundu lesa Guðs orð og gerast kunnug við skriftina.

At enda skal nevnast, at stríðið millum pávan og Luther endaði við, at pávin rendi Luther og hansara partamenn úr tí katólsku kirkjuni. Trúbótin gjørdist ein veruleiki, og skilnaður kom millum ta katólsku kirkjuna og ta protestantisku kirkjuna. Hin føroyska fólkakirkjan, eins og hinar norðurlendsku kirkjurnar, er sprottin úr tí protestantisku kirkjuni

Luther meinti, at kirkjufólkið skuldi sleppa at syngja við til gudstænastuna, ikki einans kórið, sum var vanligt tá á døgum. Hetta kravdi, at fólkið fekk sálmar á móðurmálinum, og Luther fór undir at yrkja sálmar. Hetta dámdi pávanum ikki, og hann setti forboð fyri sálmunum, men fólkið tók teir til sín. Luther yrkti til kend løg, so at tað var lætt hjá fólki at syngja við. Sjálvur yrkti hann 37 sálmar, og hann fekk eisini aðrar samtíðarmenn og vinir at yrkja. Luther segði, at sálmurin skuldi vera einfaldur málsliga, og endamálið við sálminum var at uppala og læra meinigheitina, so at tey fingu lut í hinum kristna boðskapinum. Sálmurin skuldi harafturat hjálpa til, at Guðs orð varð varðveitt í fólkinum.

Thomas Hansen Kingo 1634-1730

Thomas Hansen Kingo var borin í heim 15. des. 1634 í Slangerup í Norðursælandi. Í dópinum fekk Kingo navnið Thomas eftir abbanum, sum var úr Skotlandi og búsettist í Danmark. Pápi hansara æt Hans Kingo og var vevari í Slangerup.

Seks ára gamal bleiv Kingo næmingur í lítla latínskúlanum í Slangerup. Eins og aðrir latínskúlanæmingur skuldi Kingo eisini syngja í kirkjuni.

Fimtan ára gamal bleiv Kingo næmingur á Fredriksborgs latínskúla. Kingo kom at búgva hjá Albert Bartolin, sum var rektari á skúlanum, og sum varð mettur at vera ein av landsins fremstu lærarum í tónleiki. Hetta kom tí áhugaða og næma Kingo sera væl við seinni í lívinum, bæði sum prestur og yrkjari.

Eftir studentaskúlan fór Kingo á Universitetið í Keypmannahavn at lesa gudfrøði. Hetta tíðarskeiðið gekk pest í Keypmannahavn, og tí bleiv Universitetið latið aftur eina tíð. Tá ið av tornaði, var ein fjórðingur av fólkunum í Keypmannahavn deyð, um 30.000 fólk. Kingo tók lesnaðin uppaftur og eftir at hava lisið í trý ár, tók hann gudfrøðiprógv í 1658.

Í 1661 gjørdist Kingo hjálparprestur hjá prestinum í Kirkehelsinge-Døsselbjerg. Tað er um hetta mundið, at Kingo fer at yrkja. Hansara fyrstu yrkingar eru ungdómsyrkingar um lívið úti á landinum og kærleiksyrkingar.

Í 1668 varð Kingo settur sum prestur í heimbygdini Slangerup og giftist við Sille Balchenborg, men teirra eydna gjørdist stokkut, tí hon doyði eitt lítið ár seinni. Eftir hetta var Kingo giftur tvær ferðir.

Frá 1677 til sín deyða í 1703 var Kingo bispur í Odense.

Tíðin, Kingo livdi í, var ein trupul tíð, sum var merkt av kríggi og tess avleiðingum so sum sjúku, pest og hungursneyð. Hetta sæst eisini aftur í sálmunum hjá Kingo. Sálmarnir eru yrktir í barokkstílinum. Barokkstílurin lýsir mótsetningarnar í lívinum, eydnu og óeydnu, gleði og sorg, ljós og myrkur, tað ið hoyrir Guði og himlinum til og

tað, ið hoyrir menniskjanum og jarðarlívinum til. Barokkstílurin er merktur av sterkum myndamáli, og mótsetningarnir gera, at myndirnar koma týðiliga fram. Tessvegna gerast yrkingarnar myndakendar. Hetta myndakenda ger tað lættari at skilja yrkingarnar, hóast orðini og yrkingarlagið tykist fremmant og mangan háfloygt.

Hesin hugsunarhátturin slerdi eisini ígjøgnum politiskt. Danski kongurin stýrdi sínum jarðiska ríki við myndugleika frá Guði – einaveldistankin. Kingo stuðlaði tí tankanum til fulnar.

Kingo yrkti bæði kærleiksyrkingar, sangir og sálmar. Hann yrkti til kend løg, so fólk kundu syngja sálmarnar. Í 1674 og 1683 gav hann sálmar út, og tí bað kongur Christian V hann gera eina nýggja sálmabók. Kongur lovaði, at Kingo tey fyrstu 20 árini skuldi eiga ágóðan av bókini. Hóast bókin var liðug seks ár seinni, varð hon ongantíð prentað.

Tíggju ár seinni kom ein onnur sálmabók – Den forordnede Ny Kirke-Psalme-Bog – út. Hendan bókin gekk undir heitinum *Kingos salmebog,* á føroyskum Kingobókin ella Kingo sálmabókin. Av teimum 310 sálmunum í bókini átti Kingo teir 85. Her kann leggjast afturat, at í tí føroysku sálmabókini, sum vit nýta í dag, eigur Kingo 30 av 512 sálmur.

Kingo vildi vekja síni medmenniskju upp til sanna og livandi guðstrúgv. Eina trúgv, sum var persónlig og hevði avleiðingar fyri tað dagliga lívið hjá fólki. Kingo segði, at ein trúgv, sum ikki var fylgd av gerðum, var ein feiltulking av Bíbliunnar boðskapi, tí í sínum orði sigur Guð ikki einans, hvat vit skulu trúgva, men eisini hvat vit skulu gera.

Eftir Kingo liggja í alt 234 sálmar

Hans Adolf Brorson 1694-1764

Hans Adolph Brorson varð føddur í 1697 í Randerup í Suðurjútlandi. Foreldrini vóru Broder Brodersen og Catharine Margrethe Clausen. Pápin var prestur í Randerup, og Brorson átti tveir eldri brøður Nicolei og Broder, sum eisini vóru prestar. Allir tríggir brøðurnir fingu týðandi størv innan kirkjuna og fingu harvið eisini gjørt sína ávirkan galdandi.

Tey fyrstu árini vóru dreingirnir undirvístir av einum húslærara. Síðani gekk leiðin til Katedralskúlan í Ribe. Undirvísingin í Katedralskúlanum miðaði fyrst og fremst ímóti, at næmingarnir skuldu lesa gudfrøði.

Í 1712 fóru allir tríggir brøðurnir til Keypmannahavnar at lesa gudfrøði. Tað gekk væl hjá hinum báðu elstu at lesa, men hjá Brorson gekst ikki so væl. Endin var, at Brorson verður sjúkur og fór heim aftur við ongum prógvi.

Í 1717 fekk Brorson starv sum húslærari í Løgumkloster og starvaðist har í fýra ár. Í Løgumkloster kom Brorson í samband við pietismuna, eina andaliga rørslu, sum kom hagar úr Týsklandi. Tann pietistiski hugsunarhátturin bygdi á, at spurningar ikki einans skuldi skiljast við heilanum, men eisini við hjartanum t.v.s. kenslunum. Tað sama galt kristindómin. Tað var ikki nokk at vita, hvat kristindómurin segði, ein skuldi eisini kenna kristindómin, ikki einans vita seg frelstan, men eisini kenna seg frelstan. Pietisman vendir sær frá tí, sum tey mettu sum vanakristindóm. Fólk skuldu venda um, játta syndirnar fyri Guði og síðani liva eitt lív í trúgv og gudsótta. Hesin frómleiki skuldi ikki einans venda sær inneftir móti Guði, men eisini úteftir móti tí dagliga lívinum og føra við sær hjálpsemi móti teimum, sum trongdu hjálp og móti missiónsarbeiði.

Í 1721 fór Brorson aftur til Keypmannahavn og gjørdi seg lidnan við lesnaðin. Sama ár giftist hann vit Catherine Steenbek Clausen. Hann var tvær ferðir giftur, og seinna kona hansara var Johanne Christiane Riese. Brorson kendi eisini til persónliga mótgongd. Elsti sonur Brorson var minni mentur, og tá á døgum var eingin hjálp at heinta, so tey brekaðu vóru sett í búr heima. Harafturat misti Brorson 10 børn. Hetta

hevði sjálvandi sína ávirkan á Brorson, men kortini ber hansara skaldskapur boð um, at hann ikki einans sær tað dapra í lívinum og tilveruni sum heild.

Brorson var dugnaligur og arbeiðssamur prestur. Í 1729 fekk hann embæti í Tønder, haðani gekk leiðin til Ribe, fyrst sum stiftpróstur og síðani í 1744 sum bispur .

Tíðin, Brorson livdi í, var merkt av einaveldinum og pietismuni. Í einaveldistíðini var kongur (fúrstin, keisarin) hildin at vera Guðs umboðsmaður (húshaldari) á jørð. Kongurin hevði sambært trúbótartankunum fingið sín myndugleika frá Guði og var tí bæði ovasti myndugleiki í ríkinum og í kirkjuni. Kongurin umsat bert ríkið, sum í veruleikanum var Guðs ríki, og kongsins átrúnaður, tann evangelisk lutherska læran, gjørdist tessvegna tjóðarátrúnaður og siðalagsliga støðið í ríkinum. Kongurin hevði til uppgávu at verja ríkið móti spottarum og ranglærarum.

At Brorson var pietistur, hevur óivað havt sína ávirkan á, at kongurin Chr. VI setti hann sum bisp í Ribe. Brorson arbeiddi ótroyttiligur í andanum hjá pietismuni og einaveldinum fyri at boða ein álvarsaman kristindóm og at hækka tað siðalagslæruliga og andaliga støðið í fólkinum.

Longu meðan Brorson var í Løgumkloster, byrjaði hann at týða týskar sálmar. Hann fór eisini undir at yrkja sálmar. Brorson yrkir til kenslurnar og um kenslurnar, ofta samanber hann kristindómin við nakað sum angar, brennur ella smakkar, t.d. eina rósu, eld og mat. Hann metti, at serliga hjarta kundi skilja teir lutirnar, ið vóru týdningarmiklir fyri kristindómin. Í hjartanum birtist vón, kærleikin kyknar og trúgvin verður brennandi.

Hetta var ein heilt nýggjur yrkingaháttur, nevniliga um, hvat hin einkulti kendi ella hugsaði. Fyrr hevði ikki verið hugsað so nógv um, at átrúnaðarligar kenslur vóru ymiskar frá persóni til persón. Nú tá ið hvør einsæris skuldi kenna trúnna í hjartanum, kom fram, at bæði kvinnur og børn eisini høvdu tílíkar kenslur. Brorson yrkti enntá ein sálm, ið var serliga ætlaður børnum, og er tað sálmurin *Her koma Jesus tíni smá*.

Sálmaskaldskapurin hjá Brorson kom fyrst út í smáheftum. Í 1739 kom eitt stórt savn *Troens Rare Klenodie* og eftir deyða hansara kom savnið *Svane Sang* út.

Nicolaj Frederik Severin Grundtvig 1783-1872

Nicolaj Frederik Severin Grundtvig varð føddur 8. sept. 1783 í Udby á Sælandi. Pápin, Johan Grundtvig, var prestur í Udby.

Tey fyrstu árini fekk Grundtvig heimaundirvísing, men 9 ára gamal varð hann sendur til Jútlands, har hann fekk privatundirvísing. Í 1798 byrjaði hann á latínskúlanum í Århus. Seinni kallaði Grundtvig tátíðar skúlaháttin "hin svarta skúlan". Hetta komst av, at skúlagongdin var merkt av at terping, og næmingarnir skuldu duga alt uttanat. Harafturat vóru næmingarnir ofta harðliga viðfarnir.

Eftir latínskúlan las Grundtvig gudfrøði í Keypmannahavn. 21 ára gamal tók hann embætisprógv, men fekk einki starv, fyrr enn hann var 25 ár. Grundtvig slapp heldur ikki at hjálpa pápanum, sum tá var vorðin sjúkur og tørvaði ein hjálparprest. Grundtvig settist tó ikki hendur í favn, og hann arbeiddi sum húslærari og skrivaði bøkur. Hann skrivaði m.a. um norrøna gudalæru og danmarkarsøgu.

Í 1810 helt Grundtvig royndarprædiku í Keypmannahavn. Hann byrjaði prædikuna við orðunum: Hví er Guðs orð horvið úr húsi sínum? Í prædikuni ákærdi hann sínar starvsfelagar fyri at prædika um mangt og mikið – bara ikki um trúnna á Guðs orð. Prædikan voldi til stóra øsing, og Grundtvig fekk nógvar óvinir. Sjálvur kom hann í svára sálarkreppu. Hann fór heim til pápan, og sum frá leið, fekk hann aftur frið í tí luthersku læruni, og hann setti sær fyri at stríðast ímóti vanatrúgv og rationalismu.

Pápi Grundtvig var, sum áður sagt, sjúkur og frá 1811 hjálpti Grundtvig honum í starvinum. Tá ið pápin doyði, søkti Grundtvig embætið, men fekk tað ikki. Hóast Grundtvig søkti fleiri embæti, gingu átta ár, áðrenn hann fekk embæti á Præstø. Árið eftir fekk hann starv í Vor Frue Kirke í Keypmannahavn. Fólk fóru at leggja merki til Grundtvig, og sum frá leið, savnaðu hansara prædikur nógv fólk.

Í 1826 hátíðarhelt danska fólkakirkjan, at 1000 ár vóru liðin síðan kristniboðanina í Danmark. Grundtvig yrkti nakrar sálmar til hetta høvi, men teir vóru ikki mettir at vera egnaðir sum kirkjusálmar. Hetta neit Grundtvig so fast, at hann segði seg úr starvinum beinanvegin. Um sama mundi kom Grundtvig í stríð við teir lærdu í

Keypmannahavn, sum hildu seg til rationalismuna. Hin rationalistiski hugsanarhátturin kravdi, at átrúnaður og lærugreinar (lærusetningar) skuldu kunna prógvast skynsamliga. Hann avvísti alla trúgv, sum lá yvir vanligum menniskjaligum fatanarevnum (viti og skili) og góðtók einki "yvirnatúrligt". Endin gjørdist, at Grundtvig var settur undir sensur (eftirlit), so at hann ikki kundi geva nakað út.

Í 1839 fekk Grundtvig aftur starv. Hann varð settur sum prestur í Vartov kirke í Keypmannahavn, og har virkaði hann til sín deyð í 1872.

Grundtvig gjørdist áhugaður í politikki og sat á fólkatingi í nøkur ár, 1849-58. Grundtvig var sum altíð eldhugaður og tagdi ikki síni sjónarmið burtur. Hann var frælslyntur (liberalur) og arbeiddi fyri frælsi í øllum lívsins viðurskiftum. Hann talaði m.a. fyri borgarligari vígslu og átrúnaðarligum frælsi, í teirri tíðini tá fólk skuldu vera limir í tí evangelisk luthersku kirkjuni. Eisini var hann vinaliga sinnaður móti tí spírandi kvinnurørsluni.

Grundtvig gjørdi seg eisini galdandi á skúlaøkinum, har hann arbeiddi fyri at broyta korini hjá børnum og ungum og háskúlatankanum. Grundtvig vildi burtur frá tí "svarta skúlanum." Børnini skuldu ikki noyðast, men undirvísast. Grundtvig førdi fram, at undirvísing framdi upplýsing (læring) og gav børnum hug, mót og vilja at læra, meðan tvingsilin einans var drepandi og køvandi fyri menningina. Í háskúlanum var stórur dentur lagdur á mál, mentan og tjóðskaparrørslu undir felagsheitinum "Upplýsing fyri lívi".

Lívið hjá Grundtvig var í nógvar mátar skiftandi og merkt av stórum kreppum. Hann hevði sterkar meiningar og kom tessvegna ofta í stríð við teir lærdu og ráðandi í Keypmannahavn, sum ikki vildu góðtaka hansara meiningar.

Grundtvig var tríggjar ferðir giftur. Í 1818 giftist hann við Elisabeth Blicher, í 1851 við Marie Toft og í 1859 við Asta Reedtz.

Tíðin, Grundtvig livdi í, var merkt av stórum broytingum, tá frælsisrørslur og frælsishugsjónir sóu dagsins ljós. Í 1788 varð stavnsbandið avtikið í Danmark, og

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

fólkið kravdi eina fría stýrisskipan. Fríðrikur VII kongur boygdi seg, og einaveldið var avtikið, og í staðin fekk Danmark eina grundlóg 5. juni 1849.

Hetta tíðarskeiðið verður eisini nevnt upplýsningartíðin. Vitið og siðalagslæran vóru sett í hásætið. Og sum nakað heilt nýtt sær kirkjukritikkur dagsins ljós. Tað er ikki nøkur sjálvfylgja longur at góðtaka Bíbliuna sum myndugleika (autoritet) og kristindómin sum sannleika. Í kirkjuligum høpi vinnur deisman fram. Stórur dentur verður lagdur á at kunna grundgeva skynsamliga fyri trúnni. Jesus var hin stóri siðalagslærarin. Lítið ella einki varð talað um Jesu sáttargerð. Heilagi andin bleiv næstan ikki nevndur, tí hann var alt ov yvirnatúrligur. Hetta førdi til, at fleiri mótrørslur kyknaðu. Tvær teirra vóru Indre Mission og grundtviganismen .

Grundtvig yrkti uml. 1600 yrkingar, sangir og sálmar. Sálmarnir vóru langir, 20-30 ørindi, tí máttu teir styttast, skuldu teir nýtast til gudstænastu. Harafturat týddi og umyrkti Grundtvig ein hóp av sálmum. Grundtvig vildi endurnýggja sálmasongin, sum hann metti var ov nógv ávirkaður av tí skynsama.

Grundtvig yrkti sálmar at nýta í gudstænastuni. Sálmarnir siga frá, at Guð sjálvur er til staðar í meinigheitini undir gudstænastuni – í dópinum, altarins sakramenti og í orðinum, sum verður prædika. Grundtvig yrkti mest lovsangir og takkarsangir. Hann yrkir ikki so nógv um Jesu deyða, men harafturímóti um Jesus sum hin upprisna Kristus, lívsins harra. Grundtvig helt, at Guðs ríki ikki er hinumegin ella nakað komandi, nei tað er longu til staðar mitt millum okkum, har kærleikin ræður.

Vert er at leggja afturat, at Grundtvig og hansara tankar eisini fingu stóran týdning fyri føroyingar og føroyska mentan. Føroyingar, sum høvdu verið á donskum háskúlum, gjørdust ídnir talsmenn fyri tjóðskaparrørsluna her á landi. Tjóðskaparrørslan arbeiddi m.a. fyri at vinna føroyskum máli sín sjálvsagda rætt, bæði í kirkju og í skúla. Sjálvur talaði Grundtvig fyri, at føroyingar skuldu hava rætt til at nýta føroyskt mál, tí øll áttu rætt at nýta sítt móðurmál. Sonur Grundtvig, Svend Grundtvig, var eisini ein hollur stuðul hjá føroyingum, tá ið talan var um at varðveita føroyska mentan og at vinna málinum rætt og viðurkenning.

Jacob Dahl 1878-1944

Jacob Dahl var føddur 5. juni 1878 í Vági. Foreldrini vóru Elsebet Susanne og Petur Hans Dahl. J. Dahl kom av keypmannaætt. Abbin, pápin og pápabeiggin vóru keypmenn, eisini vóru teir undangongumenn á fleiri økjum. Pápin og pápabeiggin bygdu skúla til børnini í Vági og løntu læraranum.

Jacob Dahl vaks upp í eini bygd í stórari menning og tók lut í øllum vanligum arbeiði, men 15 ára gamal fór hann til Havnar at ganga í skúla. Í 1896 tók Jacob Dahl prógv á Føroya Læraraskúla og var settur sum lærari við Realskúlan, men var bert í starvinum eitt ár. Hugurin stóð til víðari lesnað. Hann fór til Danmarkar á studentaskeið, síðani las hann gudfrøði í Keypmannahavn og tók prógv í 1905.

Í 1908 kom Jacob Dahl aftur til Føroya og var lærari í Realskúlanum og Læraraskúlanum. Sama ár giftist hann við Mariu Hansen.

Í 1912 var Jacob Dahl settur sum sóknarprestur í Suðurstreymoy. Í 1918 gjørdist hann Føroya próstur, og hetta starv røkti hann í góð 25 ár til sín deyða í 1944.

Jacob Dahl vaks upp í einari broytingartíð í Føroyum. Stórar broytingar vóru á tí búskaparliga og mentanarliga økinum. Alt frá barnaárum var hann hugtikin av føroyskum máli, og kom hetta at merkja hansara lívsstarv.

Meðan Jacob Dahl gekk í læraraskúla, stóð Føroyingafelag í besta blóma, og fekk henda rørslan stóra ávirkan á hann bæði heima á landi og seinni, tá ið hann fór niður at lesa. Í lestrartíðini savnaðist hann við øðrum føroyingum, sum eisini vóru í lestrarørindum í Danmark. Eisini nýtti hann tíð til at sita á Tjóðbókasavninum (Nationalbibloteket) og skriva av og granska tað, sum áður var sagt um Føroyar og føroysk viðurskifti.

Heimafturkomin helt Jacob Dahl fram við sínum arbeiði at vinna føroyskum máli frama. Hann kom mangan í andglettin, tí hann nýtti føroyskt mál í síni undirvísing, og hann var ofta klagaður fyri hetta. Hann stríddist eisini fyri at vinna føroyskum máli

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

rætt innan kirkjugátt. Eitt arbeiði, sum var ógvuliga torført, tí fleiri vóru ímóti hesum, bæði av átrúnaðarligum og politiskum grundum.

Longu áðrenn føroyskt gjørdist kirkjumál, prædikaði Jacob Dahl javnan á føroyskum. Hetta var á Háskúlanum seinnapart sunnudag, og nógv fólk savnaðust har. Prestar kundu, sum frá leið, søkja myndugleikarnar um at sleppa at prædika á føroyskum, men tað var ógvuliga tvørligt, og stór ósemja var millum manna um hetta. Politiskt var heldur ikki semja um hetta, og serliga Sjálvstýrisflokkurin gjørdi seg til talsmann fyri at nýta føroyskt sum kirkjumál.

Skuldi føroyskt vera kirkjumál, so var eisini neyðugt við føroyskari bíbliu, ritualum og sálmum. Bókmentaliga høvuðsverkið hjá Jacob Dahl má sigast at vera týðing hansara av Nýggja Testamenti, sum hann týddi úr frummálinum. Nýggja Testamenti kom fyrst út í smáheftum frá 1923 til 36, men í 1939 kom NT samlað. Eins og vanligt tá á døgum, var høvuðssjónarmiðið við týðing Jacob Dahls, at hon skuldi liggja so nær upprunamálinum sum gjørligt. Jacob Dahl fekk tí ein annan trupulleika, sum mátti loysast, og tað var, at føroyingar høvdu einki bíbliumál. Trupulleikin varð loystur á tann hátt, at Jacob Dahl sjálvur gjørdi eitt føroyskt bíbliumál.

Jacob Dahl týddi eisini bøkur í Gamla Testamenti. Longu áðrenn hann týddi NT, var hann farin undir at týða úr GT. Sálmarnar týddi hann í tíðarskeiðinum 1912-21, Orðtøkini og Prædikarin í 1926. Tað, sum eftir var av GT, tók Kristian Osvald Viderø sær av, og var øll umsetingin liðug um 1950. Bíblian kom út 1962. Frammanundan hevði tó Victor Danielsen gjørt tað bragd at geva alla Bíbliuna út á føroyskum í 1949, men hon var ikki týdd úr upprunamálinum.

Jacob Dahl týddi eisini ritualini í 1918-19, men tað gekk ógvuliga striltið at fáa tey góðkend. Aðrir høvdu eisini týtt ritualini, men endin var, at Jacob Dahls týðing av ritualunum varð autoriserað 30. okt. 1930, og frá hesum degi var loyvt at halda fullfíggjaða gudstænastu á føroyskum máli.

Longu frá 1927, tá ið tað gjørdist lógligt at halda alla hámessuna á føroyskum, læt Jacob Dahl prenta hefti við føroyskum sálmum. Heftini vóru nýtt til ymisk høvi, t.d. hátíðir í Havna kirkju, dóp, altargongd, konfirmatión, kirkjuvígslu og umreisur

(visitats) úti á bygd. Saman við Símuni av Skarði royndi Jacob Dahl at fáa eina føroyska sálmabók til vega, men teirra uppskot til sálmabók rendi seg í somu trupulleikarnar sum ritualini, men hesaferð fall teirra uppskot. Tessvegna kom eingin føroysk sálmabók út fyrr enn 1961.

Jacob Dahl sá eisini týdningin av, at deknagudstænastan kundi vera á føroyskum. Prestarnir vóru ikki so nógvir í tali tá, og tí vóru danskir lestrar lisnir í kirkjunum. Fyri at bøta um hetta gav hann í 1934 út lestrabókina "Í lýsing", og fýra ár eftir deyða hansara kom "Meðan hildið verður heilagt". Hetta vóru eisini prædikur, sum Jacob Dahl hevði hildið.

Jacob Dahl sum sálmaskald og týðari

Í sálmabókini eigur Jacob Dahl uml. ein sættapart av sálmunum í Sálmabókini. Har eru tó fleiri týddir sálmar enn upprunasálmar. Tað sýnist, sum at Jacob Dahl hevur lagt stóran dent á at yrkja og týða til allar tættirnar í gudstænastuni, soleiðis at til bar at hava eina fullfíggjaða føroyska guðstænastu. Jacob Dahl týðir eitt breitt úrval av kjarnusálmunum úr londunum uttan um okkum, men høvuðsdentur má sigast at vera lagdur á lutherskan og danskan sálmasið (sálmatraditón)

Vit hava longu nomið við nógv, sum Jacob Dahl hevur lagt eftir seg, men hann var ógvuliga virkin á tí bókmentaliga økinum. Av øðrum, sum hann læt úr hondum, er at nevna: Týðing av Luthers lítlu Katekismus 1922, týðing av Baslevs bíbliusøgu 1944, Glottar 1928, Stavnhaldið 1944, Føroysk mállæra til skúlabrúks 1908, Sólin og sóljan 1948, Sólaris 1940, Halgisøgur I og II, týðing eftir Selmu Lagerlöf 1921-22. Harafturat skrivaði hann í ymsum bløðum, t.d. Færøsk kirketidende og Kristeligt ungdomsblad.

Mikkjal Dánjalsson á Ryggi 1879 – 1956

Mikkjal á Ryggi var føddur 17. Oktober 1879 í Miðvági. Foreldrini vóru Marin Margretha og Dánjal Pauli Mikkelsen á Ryggi. Mikkjal á Ryggi gekk í barnaskúla í heimbygdini. Eftir barnaskúlan fór hann eitt ár í realskúlan í Tórshavn. Eftir lokna skúlagongd tók hann lut í øllum vanligum arbeiði. Tó sást tíðliga, at hansara hugur stóð til nakað annað.

Í 1900 fór Mikkjal á Ryggi til Danmarkar á Fredriksborgs háskúla í Hillerød. Skeiðið vardi vetrarhálvuna, og um summarið arbeiddi hann á bóndagarði. Veturin eftir var Mikkjal á Ryggi á Askov fólkaháskúla. Hesin háskúlin hevði sín uppruna í tí elstu háskúlarørsluni í Danmark og byggir á tankarnar hjá N.F.S. Grundtvig. Høvuðstankin er: Upplýsing fyri lívið. Lærugreinar sum bíbliusøga, norðurlendsk mál, søga og mentan, stóðu ógvuliga frammarlaga, og ikki kann sigast annað enn, at hetta fekk stóran týdning fyri lívsstarvið hjá Mikkjal á Ryggi .

1. des. 1919 varð Mikkjal á Ryggi settur lærari í Bø og Gásadali. Hetta starv røkti hann í góð 25 ár, til hann fór frá við eftirløn. Mikkjal á Ryggi var ikki læraralærdur, men tað var stórt læraratrot, og tí varð hann settur í starv. Sum lærari legði Mikkjal á Ryggi stóran dent á at læra næmingarnar føroyskt mál. Hann royndi at fáa næmingarnar at tala og skriva føroyskt rætt, og hann legði eisini stóran dent á málløruna. Men hann hugsaði ikki einans um málið. Eisini væntaðu lærubøkur á føroyskum, og tí fór hann undir at skriva lærubøkur.

Mikkjal á Ryggi var ikki einans lærari, hann var eisini kent skald, granskari og rithøvundur. Hann málaði, teknaði og fekst við at taka myndir (fotografera). Heilt frá ungum árum av fekst hann við at granska lív og vøkstur í náttúruni, og alt varð skrivað niður. Hartil teknaði og málaði hann myndir av fuglum.

Mikkjal á Ryggi hevði nógv álitisstørv, hann sat á tingi fyri Sjálvstýrisflokkin í tíðarskeiðinum 1915-19, og var sóknarstýrisformaður og nevndarlimur og formaður í Lærarafelagnum.

Sálmar til fólkaskúlan, framhaldsdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Í 1939 giftist Mikkjal á Ryggi við Jacobinu Joensen, ið var ættað úr Gásadali. Tey búsettust í Gásadali, men tá ið Mikkjal á Ryggi fór frá sum lærari, fluttu tey til Miðvágs. Mikkjal á Ryggi gjørdist skjótt eftir hetta sjúkur av tuberklum, og ellivu tey seinastu árini av lívinum var hann á Sanatoriinum í Hoydølum, har hann doyði 77 ár gamal.

Mikkjal á Ryggi vaks upp í eini broytingartíð. Samfelagið broyttist frá at vera eitt bóndasamfelag til at vera eitt fiskivinnusamfelag, og fólkið fekk so við og við meira samfelagsligt medvit. Við sínum stríði at vinna føroyskum máli rætt í skúla og í kirkju, setti tjóðskaparrørslan lív í kjakið um málspurningin. Vekingarrørslurnar, brøðrasamkoman og heimamissiónin, komu til landið, og kirkjan stóð mangan í andglettinum.

Mikkjal á Ryggi legði nógv eftir seg á tí bókmentaliga økinum. Sum heilt ungur fór hann at yrkja sálmar, men teir eru ikki til skjals longur. Í 1905 byrjaði hann at yrkja alment í Tingakrossi undir dulnevninum Gunnleygur. Mikkjal á Ryggi yrkti tjóðskapar- og fosturlandssangir. Hann yrkti eisini um náttúruna og tað dagliga arbeiðið – vinnulívið. Hann skrivaði bygdarsøgu, stuttsøgur, skúlabøkur og yrkti kvæði. Harafturat bæði yrkti og týddi hann ein hóp av sálmum.

Eins og trúgvin hjá Mikkjal á Ryggi er at finna í gerandisyrkingunum, soleiðis finnur tað gerandisliga veg inn í sálmarnar hjá honum. Mikkjal á Ryggi vaks upp í hini sterku gudstrúnni, sum eyðkendi bóndasamfelagið, og hetta sæst aftur í sálmum hansara, sum vitna um eitt einfalt og barnsligt álit á Guð faðir og ein inniligan kærleika til frelsaran Jesus.

Hyggja vit í Sálmabók Føroya Kirkju, síggja vit, at serliga tveir rithøvundar, Mikkjal á Ryggi og Jacob Dahl, eiga hvør sín sættapart av sálmunum í Sálmabókini, antin sum upprunayrkingar ella týðingar. Meðan Jacob Dahl hevur nógvar týðingar og færri upprunasálmar, síggja vit tað øvugta hjá Mikkjali á Ryggi. Viðvíkjandi týðingunum hjá honum er serliga at siga, at hann týðir rættuliga nógv úr íslendskum máli, sum ikki var so vanligt tá. Harafturat týðir hann úr norskum, svenskum, enskum og donskum máli.



Føroya Skúlabókagrunnur 2008